| | |
|---|---|
| **TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ**<br>**30. mai 2013** | Blað nr.:<br>**10537** |
| | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** **30. mai 2013** **kl. 18.00**
**Stað:** **Býráðssalurin**
**Málsnr: 92/13-120/13**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Heðin Mortensen
Jógvan Arge
Elin Lindenskov
Bjørghild Djurhuus
Helena Dam á Neystabø
Sigrún Mohr
Tróndur Sigurdsson
Halla Samuelsen
Marin Katrina Frýdal
Jákup Dam
Sjúrður Olsen
Bogi Andreasen
Annfinn Brekkstein

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Ingibjørg Berg

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

**LUTTÓKU EISINI:**
Ingunn Eiriksdóttir
Jóan Petur Hentze
Jónsvein Lamhauge

# MÁL FYRI OPNUM HURÐUM KL. 19.00

**Býráðsformaðurin setti fundin og las upp dagsskránna.**

**93/13** **2013-0175**

**Mál beind í nevndir**

**Býráðið 30. mai 2013:** Tikið til eftirtektar.

**94/13** **2013-0143**

**Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2013**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. § 10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna tilfarið.

Roknskapurin fyri januar 2013 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 13. februar 2013:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 21. februar 2013:** Framlagt og einmælt góðkent.

Roknskapurin fyri februar 2013 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 13. mars 2013:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 21. mars 2013:** Framlagt og einmælt góðkent.

Roknskapurin fyri mars 2013 verður lagdur fram.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2013:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri apríl 2013 verður lagdur fram.

**Fíggjarnevndin 29. mai 2013:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 30. mai 2013:** Framlagt og einmælt góðkent.

**95/13** **2013-1001**

**Framfluttar játtanir**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Í sambandi við at roknskapurin fyri 2012 verður gjørdur upp, verður eisini gjørt eitt yvirlit yvir rakstrar- og íløgujáttanir at flyta til 2013.

Hesar skulu játtast í býráðnum sum eyka játtan. T.v.s. við tveimum viðgerðum.

Yvirlitið saman við ynsktum broytingum verður lagt fram saman við fyribils roknskapinum fyri 2012.

| | **Flytast av** | | | **Flytast til** | |
|---|---|---|---|---|---|
| | **Trivnaðarnevndin:** | | | | |
| 2101 | Naina | 38.000 | 2613 | Børn sett heiman... | 2.266.000 |
| 2744 | Døgurðaskipan fyri... | 90.000 | 2745 | Tiltøk á eldraøkinum | 30.000 |
| 2716 | Gjald fyri pláss í... | 65.000 | | | |
| 2102 | lagt úr fyri..... | 102.000 | | | |
| 2617 | Brúkaragjald.... | 62.000 | | | |
| 2610 | Barnaverndarnevnd | 78.000 | | | |
| 2810 | Fíggjarligt frípláss | 100.000 | | | |
| 2612 | Barnavernd | 495.000 | | | |
| 2310 | Barnatannrøktin | 1.266.000 | | | |
| | **Tilsamans** | **2.296.000** | | **Tilsamans** | **2.296.000** |

| | **Mentamálanevndin:** | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 5210 | Kvøldskúlin | 490.000 | 4112 | Nólsoyar skúli | 90.000 |
| | | | 4113 | Velbastaðar skúli | 400.000 |
| | **Tilsamans** | **490.000** | | | **490.000** |

| | **Tekniska nevnd:** | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 6110 | Umsiting og røkt av bygningum | 750.000 | 6210 | Fríðkan og viðlíkahald | 750.000 |
| 6110 | Umsiting og røkt av bygningum | 460.000 | 6710 | Vatnveiting | 460.000 |
| | **Tilsamans** | **1.210.000** | | | **1.210.000** |

Trivnaðarstjórin og tekniski stjórin mæla til hesar broytingar.

**Tilmæli:**
Fyrisitingarstjórin og fíggjarleiðarin mæla til at játta framflyting á t.kr. 33.311 netto, til rakstur og t.kr. 142.968, netto, til íløgur. Umframt at taka undir við tilmælinum um broyting.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2013**: Samtykt við 1. viðgerð at taka undir við tilmælinum og umframt hetta at flyta 300.000 kr. av konto 1560 til 1210 og beina málið í býráðið.

**Býráðið 2. mai 2013:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 30. mai 2013:** Einmælt samtykt.

**96/13** **2011-0953**

**Dekksbáturin Fram**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Loyvi um at virka fyri at keypa dekksbátin Fram, frá Søren Pram Sørensen.

**Fíggjarnevndin 6. apríl 2011:** Samtykt at taka upp samráðingar við Søren Pram Sørensen við tí fyri eyga at keypa dekksbátin Fram.

**Fíggjarnevndin 25. juli 2011:** Kunna varð um málið.

**Ískoyti:**
Báturin er bygdur í 1923. Sambært eigara, er báturin væl røktur og í góðum standi.

Fundur hevur verið við umboð fyri eigaran, ið vil selja kommununi bátin fyri kr. 700.000.

Eigarin hevur játtað at fáa tekniska meting til vega frá Mourits Mohr og eina greining frá skipaeftirlitinum.

Fyri at kunna reka bátin má hann setast á fíggjarætlan kommununnar, m.a. fyri at kunna rinda viðlíkahald, olju, legugjald, tryggingargjald og bedingseftirlit eina ferð um árið.

**Tilmæli**
Kommunustjórin og miðfyrisitingarstjórin mæla til at keypa bátin fyri kr. 700.000, treytað av at tekniska metingin og greiningin frá skipaeftirlitinum eru nøktandi

Eisini verður mælt til at játta neyðuga peningin til raksturin

Mælt verður eisini til, at stovna eitt felag, líknandi sluppvinafelagnum, at taka sær av dagliga rakstrinum.

**Fíggjarnevndin 8. september 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at keypa dekksbátin Fram.

Samtykt at játtað kr 800.000 av konto 20910 til keypið og raksturin av bátinum.

**Býráðið fyri læstum hurðum 8. september 2011:** Samtykt við 9 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Sjúrður Olsen og Jan Christiansen.

Greiddu ikki atvøðu: Rúni Djurhuus og Jákup Símun Simonsen.

**Ískoyti.**
Báturin er skrásettur í skipaskránni sum stuttleikabátur og kann ikki brúkast til vinnu.

Higartil hava Regin Torkilsson og Finnur Ludvig saman við pápa og pápabeiggjum hjá Regini tikið sær av bátinum.

Báturin hevur verið brúktur í jólamánaðinum og hevur verið við á tveimum stevnum. Millum annað í regattasiglingini fyri træskip. Harumframt hevur báturin veri opin fyri almenninginum á ólavsøku.

NámX (Evald Rasmussen) hevur ætlanir um at nýta bátin til fiskibreytina.

Um hetta skal gerast veruleiki, er neyðugt, at báturin verður góðkendur til brúkið. Kannað verður í løtuni hjá Skipasýninum, hvørji krøv verða, og kann eisini væntast, at íløgur skulu gerast í bátin.

Tað er tí trupult at áseta hvussu nógvur peningur skal til fyri at kunna reka bátin, tí tað veldst um, hvussu nógv báturin verður brúktur, og eisini til hvørjar ábøtur skulu gerast.

Rakstrarútreiðslurnar í 2012 vóru um kr. 60.000,00.

Eingin inntøka er til bátin, men hann fekk stuðul í 2012 frá Regattasiglingini.

Um NámX skal brúka bátin, verður talan um øktar útreiðslur til olju – íløgur, trygdarútgerð o.s.fr.

Enn er eingin niðurstøða gjørd hesum viðvíkjandi, men neyðugt er við eini rakstrarfígging undir øllum umstøðum.

**Tilmæli:**
Leiðarin á løgdeildini og kommunustjórin mæla til at flyta kr. 75.000,00 til rakstur og íløgur av deksbátinum Fram av konto 20910 til konto 5366, og annars at taka hædd fyri deksbátinum Fram í fíggjarætlanini 2014.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðið 2. mai 2013:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 30. mai 2013:** Einmælt samtykt.

**97/13** **2007-1290 MJA**

**Útstykking – Djúpagil – Millum Gilja**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Útstykking í økinum, har Djúpagil møtir nýggja sambindingarvegnum við nýggja innkomuvegin.

Útstykkingin liggur í náttúruvøkrum umhvørvi við áum og gilum, sum seinni blíva størri við Djúpagil. Ætlanin er, at avkoyring til skal verða frá nýggja sambindingarvegnum til útstykkingina.

Útstykkingin vil halda fram við verandi útstykkingar fram við gilinum, niðan til nýggja sambindingarvegin og harvið eisini binda økini á báðum síðum av sambindingarvegnum meira saman.

Økið kann íalt hýsa 30 nýggj grundøki við møguliga einum øki til stovnsbygging eystanfyri. Hetta síðsta vil tó helst krevja eina íbinding afturat í sambindingarvegin.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at 500.000,- kr. verða settar av til projektering og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 7. mai 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum. Hon heitti samstundis á umsitingina at fyrireika útstykkingina soleiðis, at stykkini verða seld liðugt planeraðið. Kunnað var um at talan er um eina útstykking við 300 fermetra stykkjum við felags parkeringsplássum, gøtusambondum og skipaðum fríøkjum. Nettonýtslustigið verður 0,4.

**Fíggjarnevndin 16. mai 2007:** Samtykt at leggja kr. 500.000,- út til projektering og leggja málið fyri býráðið.

**Býráðið 24. mai 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt uppskot til útstykkingarætlan við uml. 35 grundstykkjum á 300 fermetrar og 2 felagsøkjum. Útstykkingin hevur atgongd frá sambindingarvegnum við nýggja innkomuvegin og er skipað í 4 bólkar fram við einum atkomuvegi. Atkomuvegurin hevur gongubreyt báðumegin.

Norðan fyri atkomuvegin er avsett pláss til 1 eyka parkeringspláss pr. matrikul. Innkoyringarnar til bústaðarbólkarnar eru markeraðar við vegbungum. Gøtusamband er til Stórutjørn gjøgnum ein tunnil undir sambindingarvegnum.

Grundstykkini liggja fram við 8 m breiðum vegum uttan kantsteinar. Vatnrennur úr beton er mark millum gongubreyt og koyribreyt. Koyribreytin er 4 m breið.

Ætlanin er at lata liðugt planerað grundstykkir við ásettum byggifelti og planeringshædd.

Gongugøtur eru millum bústaðareindirnar og felagsøkir. Gøturnar hava samband við verandi gøtuskipan.

Ætlanin er at bjóða útstykkingina út millum 5 ráðgevarar til projektering.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at góðkenna ætlanina og at projekteringin av útstykkingini verður boðið út millum 5 ráðgevaravirkir.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. september 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Í sambandi við støðutakanina til víðari projektering av ústykkingarætlanini, skal støða takast til atkomuviðurskifti til rørslutarnað, gongu- og súkklubreyt og reinskan av vegvatni. Vìst verður í hesum sambandi til mál nr. 2005-1436: Mál um súkklubreytir og atkomurviðurskiftini hjá rørslutarnaðum og mál nr. 2005-1437: Mál um yvirflatuvatntrupulleikar í kommununi.

Greitt verður frá útstykkingarætlanini.

**Tekniska nevnd 18. september 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við uppskotinum, men ynskir at umsitingin kemur við einum betri uppskoti um hvussu atkomuviðurskiftini til útstykkingina verða loyst.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 17. oktober 2011:** Nevndin samtykti at beina málið í teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
Plan-og rakstrardeildin hevur viðgjørt spurningin um hvussu atkomuviðurskiftini til útstykkingina verða loyst. Víst verður til TK j. nr. 2011-2473/skjalamappur 1-4.

**Tilmæli:**
Mælt verður til at taka undir við fyriliggjandi uppskoti til útstykkingarætlan - uppskot nr. 4 (j. nr. 2011-2473/4), tó við teirri broyting, at íbindingin verður yvir av framtíðar íbinding til Stórutjørn og at vegamótið verður skipað soleiðis, at

møguleiki er at avskipa ferðsutrýstið við ljósregulering, tá hetta einaferð gerst aktuelt í sambandi við framtíðar ferðslu til og frá økinum við Stórutjørn.

**Ferðslunevndin 1. november 2011:** Ferðslunevndin tekur undir við tilmælinum og beinir málið í teknisku nevnd til støðutakan.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðaran á plan- og rakstrardeildini mæla til at taka undir við ferðslunevndini og at beina endaligu loysnina og tær broytingar, tær viðføra av útstykkingarætlanini, til byggi- og býarskipanarnevndina til góðkenningar.

**Tekniska nevnd 8. november 2011:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Jákup Símun Simonsen, Jan Christiansen og Annfinn Brekkstein, ynskir at umsitingin kemur við alternativum uppskotum við kostnaðarmetingum, at leggja fyri nevndina aftur.

Ein minniluti, Levi Mørk, tekur undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Vegna krøv frá teknisku deild um broyting av atkomuviðurskiftunum í mun til upprunauppskotið (2007-1290/6), hevur umsitingin tillagað upprunauppskotið (sí skjal2007-1290/20,3). Afturat eru gjørd 2 alternativuppskot (sí skjøl 2007-1290/20,1 og 2).

Hjálagt eru yvirlit yvir veglongdir, tal av grundstykkjum og samlað grundøki.

**Tilmæli:**
Tekniska stjórin og býararkitektin mæla til:
1. At góðkenna uppskotið til útstykkingaætlan.
2. At góðkenna vegføring og íbinding treytað av góðkenning í tekniska nevnd.
3. At umsitingin ger uppskot til serstaka byggisamtykt við m.a. áseting av byggifeltum, byggilinjur o.a. at leggja fyrri nevnd.
4. At heimilda umsitingin at útvega skitsuupskot við kostnaðmeting fyri liðugt planeraði stykkir.
5. At jatta upp til 400.000kr.til at gera skitsuupskot, kostnaðameting og visualiseringar.

Halla Samuelsen var ikki við til hetta mál.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina og teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur latið gera alternativ uppskot við fyribils kostnaðarmetingum sambært samtykt í teknisku nevnd frá 8. november 2011.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at taka undir við alternativa uppskoti nr. 1, dagf. 14.11.11, j.nr. 2007-1290/20 (1 av 3). Samstundis verður mælt til at møguleiki er at avskipa ferðsutrýstið við ljósregulering, tá hetta einaferð gerst aktuelt í sambandi við framtíðar ferðslu til og frá økinum við Stórutjørn.

**Tekniska nevnd 1. desember 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2011:** Samtykt at játta 400.000 kr. av konto 6175 til at gera skitsuupskot, kostnaðameting og visualiseringar og beina málið í býráðið.

**Býráðið 14. desember 2011:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur bjóðað gerð av projektuppskoti út millum 4 ráðgevarafyritøkur. Sí útbjóðingarskjal TK j.nr.2012-0564/10. 3 tilboð er komin inn. Sí hjálagt skjal lisitatiónsprotokol TK j.nr 2012-0739.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at taka undir við lægsta tilboðnum frá Landsbyggifelagnum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilboðnum frá Landsbyggifelagnum, sum hevði lægsta boðið áljóðandi kr. 96.875,- uttan mvg.

**Fíggjarnevndn 26. apríl 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 2. mai 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin kunnar um málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 3. september 2012:** Kunnað var um málið. og at málið verður viðgjørt á komandi fundi.

**Tekniska nevnd 4. september 2012:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Landsbyggifelagið hevur latið projektuppskot til útstykkingina. Uppskotið er projektgranskað í teknisku deild og í byggideildini (sí viðmerkingar j.nr.2012-2495/2). Ymiskar avbjóðingar eru í mun til verandi uppskot.

Økið har útstykkingin liggur, sambært verandi projektuppskoti, er ójavnt og hevur lutfalsliga stórt hall. Royndargravingar vísa eisini at tað í støðum er nógv áskot, sum skal koyrast burtur.
Hetta merkir, at munandi nøgdir av tilfari skulu flytast til á ávísum vegastrekkjum og nøkrum av merktu grundstykkjunum.

**Vegur nr. 2.**
Økið har tann norðasti vegurin (vegur 2) er rímiliga slætt. Her kunnu grundstykkini leggjast fram við vegnum uttan størri uppfylling. Tó er neyðugt at spreingja fyri teimum grundstykkjunum, sum liggja tættast við høvuðsvegin “Klingran”. Hetta kann geva trupulleikar orsakað av stuttu frástøðuni til vegin.

**Vegur nr. 3.**
Fyri at fremja veg nr. 3, er neyðugt við munandi uppfylling – upp til 5 m. Hetta viðførir at grundstykkini sunnan fyri vegin eisini skulu fyllast samsvarandi upp treytað av, at planeringshæddin fyri grundstykkingini liggur 2 m undir vegkotu. Hetta ber við sær langar skráar oman til verandi lendi.

**Vegur nr. 1.**
Til veg nr. 1 er ikki neyðugt við nógvari regulering av lendinum, men í sambandi við planering av grundstykkjum eystan fyri vegin, er neyðugt við munandi uppfylling, fyri at hesi stykkini skulu verða passandi til vegin. Hallið á vegnum er 100 promillu, sum er eitt sindur meira enn tey 80 promillini, ið vit vanliga miða ímóti. Avleiðingin av einum minni halli vildi verði størri nøgdir av tilfari á veg nr. 1 og veg nr. 3. (sí viðmerkingar j.nr.2012-2495/1).

Umframt tær stóru uppfyllingarnar sambært verandi projekti, er tað neyðugt at stoypa stuðlamúrar ímillum grundstykkini, sum hava størst hæddarmun og ímóti vegnum, har planeringshæddin liggur munandi lægri enn vegkotan. Eingin kostnaðarmeting er gjørd av hesum arbeiðinum.

Sambært verandi projektuppskotið er gjørd ein kostnaðarmeting, sum gevur ein kvadratmeturprís upp á uml. kr. 1.600 ella uml. kr. 500.000 pr. grundstykki. Her er stuðlamúrarnir ikki íroknaðir.

Sambært hesum uppskotinum eru øll grundstykkini liðugt planeraðið. Tað er ikki mett ráðiligt at selja grundstykkini óplaneraðið , har hvør einstakur keypari sjálvur stendur fyri at grava út og planera sítt egna stykki. Hetta er tí, at stykkini bert eru 300 $m^2$ og tær stóru uppfyllingarnar gera tað neyðugt at byggja stuðlamúrar.

Eisini er neyðugt at gera eina serstaka byggisamtykt við skipan av bygging á økinum.
Umsitingin er í gongd við at gera eitt alternativt uppskot til útstykkingina, grundað á uppskotinum verandi uppskot, við eitt sindur færri grundstykkjum (millum 20 og 22 stykkir), fyri at sleppa undan so stórum uppfyllingum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at býarskipanardeildin arbeiðir víðari við alternativa at leggja fyri byggi- og býarskipanarnevndina aftur til endaliga góðkenning.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. desember 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt uppskot til broyting av fyriliggjandi projektuppskoti.
Vísandi til ískoyti frá fundinum í byggi og býarskipanarnevndin 04.12.2012, hevur endamálið við uppskotinum verið at:
- veghallið ikki fer uppum 80 promillu.
- minka um nøgdina av stuðlamúrum
- minka um uppfylling av lendinum.

Avleiðingin av hesum er:
- talið av grundstykkjum er minkað frá 30 til 24.
- Støddin á grundstykkjunum er í miðal hækkað frá 305 m² til umleið 328 m².
- Veglongdin er minkað frá 388 m (4 vegir) niður í 250 m (1 vegur)
- Fermeturprísurin verður mettur at minka frá uml.1.500 kr. til 1.200 kr.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at taka undir við uppskotinum og at heimila umsitingini at biðja um tilboð frá ráðgevum og gera ráðgevarasáttmála uppá at gera útbjóðingartilfar og kostnaðameting til útstykkingina.

**Tekniska nevnd 6. februar 2013:** Útsett til næsta fund.

**Tekniska nevnd 27. februar 2013:** Ein meiriluti, Elin Lindenskov, Sigrún Mohr, Marin Katrina Frýdal og Helena Dam á Neystabø, samtykti at fara á ástaðarfund.

Ein minniluti, Bogi Andreasen, tekur undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 10. apríl 2013:** Elin Lindenskov, Sigrún Mohr og Marin Katrina Frýdal vóru, saman við umsitingini, á ástaðarfundi.

Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2013:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og játta kr. 150.000 kr. afturat av framfluttum løgukarmum fyri 2012, konto 8175 til at gera ráðgevarasáttmála og útbjóðingartilfar.

**Býráðið 2. mai 2013:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 30. mai 2013:** Einmælt samtykt.

**98/13** **<u>2013-1392</u>**

**<u>Keyp av BankNordik í Niels Finsensgøtu og Húsagøtu</u>**

**Málslýsing**
Kommununi stendur í boði at keypa ognirnar hjá BankNordik í Niels Finsensgøtu, matr.n r. 363, 365 og 367 og høvuðssæti bankans í Húsagøtu matr. nr. 736ø.

**Miðbýur:**
Kommunan hevur tørv á at fáa savnað umsitingina í størri eindir og færri bygningar. Við at keypa ognirnar í miðbýnum ber til at skipa alla fyrisitingina í miðbýnum.

Samstundis fær kommunan í nógv størri mun stýrt miðbýnum og ætlanunum um ein munandi meira livandi miðbý við at binda saman Steinatún, gongugøtuna og Tórsgøtu.

Við í ognunum eru alt torgið oman móti býnum, gamla høvuðssæti bankans, Lindberg hús og Guðrun&Guðrun-bygningurin. Hetta torgið kann verða skipað heilt av nýggjum – t.d. bæði við at skapa eitt innandura øki við smáhandlum ella øðrum tænastuvirkjum, og sum atkoma til Snarskivu og Kunningarstovu.

Umsitingin verður eftir hetta primert á trimum adressum – ráðhúsinum (uml. 15), posthúsinum (uml. 45) og bankabygninginum í Niels Finsensgøtu (uml. 80).

Bygningarnir í Jóannesar Paturssonar gøtu (sosiala deild) og M.A. Winthers gøtu (barna- og ungdómsdeildin) kunnu seljast. Leigumálið hjá Kunnignarstovuni kann sigast upp. Meiaríið kann verða størri partur av útatvenda mentanarliga virkseminum í Tórsgøtu. Býarbókasavnið kann fáa betri umstøður við at fáa hølini á Káta horninum, sum í dag verða brúkt til umsiting.

Sambært uppskotinum til avtalu við BankNordik, skal bankin leiga tvær tær ovastu hæddirnar til kommununa frá 1. juli 2013, meðan bankin nýtir

kjallarahæddina, stovuhædd og 1. hædd. Kommunan yvirtekur bygningarnar 31. mars 2015.

Høvuðsbygningurin er væl viðlíkahildin. M.a. vóru vindeyguni skift út fyri fáum árum síðani. Ovastu 3 hæddirnar hava tó ikki luftskiftiskipan.

Allar hæddirnar eru við opnum skrivstovulandslagi, við nøkrum fáum skrivstovum og fundarhølum á hvørjari hædd. Hvør hæddin kann rúma uml. 20-22 arbeiðsstøðir, við undantak av 3. hædd. Á triðju hædd eru uml. 1/3 av hæddini nýttur til kantinu og køk. Við at hava felags kantinu í posthúskjallaranum, er ikki neyðugt við so stórari kantinu í bankabygninginum, og eiga hesi høli tí at verða broytt til skrivstovur.

**Húsagøta:**
Talan er um uml. 2.000 fermetra bygning. Kommunan hevur ávísar lógarbundnar tænastur innan heilsuøki, sum í dag eru spjaddar í ymsum leigumálum og/ella undir trongum hølisviðurskiftum. Bygningurin í Húsagøtu er so sentralt í býnum sum til ber við sera góðum atkomu- og parkeringsviðurskiftum, og kann loysa fleiri av trupulleikunum, sum kommunan hevur á heilsuøkinum í dag. Høvuðssætið kann tí hýsa stórum heilsudepli.

Í fleiri ár hevur ætlan verið at byggja nýggja tannlæknamiðstøð. Verandi hølisviðurskifti eru alt ov trong, og í dag er stovnurin í tveimum eindum – í miðbýnum og í skúlanum við Løgmannabreyt, har tannrætting v.m. fer fram. Hølistørvur fyri tannlæknamiðstøð, har allar tænasturnar í barnatannrøktini eru savnaðar, er mettur til uml. 1.000 fermetrar. Fyri skúlanæmingar er besta loysn í mun til flutning, at øll tannrøkt er í miðbýnum, har allar bussleiðir steðga.

Kommunan hevur eitt leigumál til kommunulæknaviðtalur á Berjabrekku, har 2 læknar húsast. Í Frúutrøð eru 2 kommunulæknar. Næstu grannar til Húsagøtu-bygningin eru kommunalu læknaviðtalurnar í Gundadali, har 4 læknar halda til, og í grannalagnum er eisini Apotekið. Við at savna læknarnar, sum í dag eru í Berjabrekku og í Frúutrøð, ber til at skapa ein veruligan depil fyri læknaviðtalurnar, har tað eisini ber til at skipa aðrar heilsutænastur, eitt nú heilsufrøðiskipanina fyri børn og ung.

BankNordik vil selja kommununi allar ognirnar fyri kr. 91.000.000.

**Tilmæli:**
Stjórnin heitir á býráðið um at fáa heimild til at samráðst við BankNordik um at keypa ognirnar hjá BankNordik í Niels Finsensgøtu, matr. nr. 363, 365 og 367, og høvuðssæti bankans í Húsagøtu matr.nr. 736ø fyri í mesta lagi kr. 91.000.000 til endamálið lýst er omanfyri, og at undirskriva sáttmála hesum viðvíkjandi við teirri treyt, at býráðið endaliga samtykkir keypið.

Mælt verður til at fíggja keypið soleiðis:

Umfígging av avdráttum í 2013 á uml. 16. mió. kr., avlop av verkætlanum, sølu av ognum og av íløgukarmi í 2014 og 2015.

**Býráðið fyri læstum hurðum 14. mai 2013:** Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum frá stjórnini við tí ískoyti, at kommunan í sambandi við keypið selur bygningarnar sambært uppskoti til fígging framlagt á fundinum.

**Ískoyti:**
Samráðingar hava verið millum stjórnina og BankNordik um keyp av ognunum hjá Bank Nordik í Niels Finsengøtu , matr. nr. 363, 365 og 367, og høvuðssæti bankans í Húsagøtu matr. nr. 736ø. Uppskot til endaligan sáttmála fyriliggur. Samlaði keypsprísurin er 92 mió kr. herav er leiguinntøka 1. mió kr. og er nettoprísurin 91. mió kr. Sáttmálin verður lagdur fyri Býráðið til góðkenningar.

52 mió kr. falla til gjaldingar í 2013 og verða fíggjaðar við umfígging av avdráttum, avlop av verkætlanum og sølu av ognum. Sambært keypsavtaluni fellur restupphæddin 40 mió kr. til gjaldingar í seinasta lagi 31. desember 2017 og verður hetta fíggjað av íløgukarmi í 2014 og 2015.

**Tilmæli:**
Stjórnin mælir til at góðkenna fyriliggjandi sáttmála.

**Býráðið fyri læstum hurðum 17. mai 2013:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 30. mai 2013:** Einmælt samtykt.

**99/13** **2013-0634**

**SEV søkir um lendi til vindmyllupark í Flatnahaga. Talan er um uml. 120.000 m² (Víst verður til mál 2012-1750**

SEV søkir um byggiloyvi til 13 vindmyllur í Húsahaga.

Býráðið samtykti 13. desember 2012, at viðmæla fyri Búnaðarstovuni, at SEV kann leiga/keypa neyðugt lendi til hetta endamálið, við ymiskum treytum.

Festarin í Húsahaga, Júst Rubeksen, hevur givið sítt viðmæli við ymiskum treytum.

Ein minni partur av verkætlanini gongur yvir á øki, sum liggur í Flatnahaga. Talan er um uml. 120.000 m², og søkir SEV um at kunna leiga/keypa lendið frá kommununi, sí kortskjal. 2013-0634/1.

Kommunan eigur Flatnahaga, og leigar kommunan hagan út til Júst Rubeksen. Sambært leigusáttmála, skal Júst Rubeksen fráboðast so hvørt sum kommunan skal nýta lendið burturav haganum.

Sambært máli nr. 2013-0578/3, hevur býráðið 21. mars 2013, samtykt at góðkenna serstaka byggisamtykt fyri vindmyllur í Húsahaga.

**Tilmæli:**
Leiðarin á løgdeildini og kommunustjórin mæla til at leiga neyðugt lendið til SEV, burtur av Flatnahaga, til somu treytir sum ásettar eru í býráðssamtyktini. 13. desember 2012-1750/10).

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2013:** Útsett.

**Ískoyti:**
Elfelagið SEV stendur fyri umsóknini um keyp/leigu av lendi.

Ætlanin er seinni at stovnseta partafelag við 20 mill. kr. í partapeningi.

Elfelagið SEV og P/F Magn, hava undirskrivað eitt ætlanarskriv (eina hensigtserklæring), har P/F Magn kann tekna upp til 1/3 av partapeninginum í nýggja felagnum og kemur Elfelagið SEV at eiga í minsta lagi 2/3 av partapeninginum.

Ætlanin er tá at nýggja partafelagið yvirtekur verkætlanina, herundir eisini møguligar leigusáttmálar.

Uppskot til leigusáttmála fyriliggur. Sí skjal 2013-0634/6.

Prísásetingin í sáttmála fylgir kunngerð nr. 95. frá 23. oktober 2007 um umsiting av landsjørð, sum seinast broytt við kunngerð nr. 129 frá 26. september 2011, sambært kapittul 9, um leigu- og sakargjøld sambært pkt. 13 framgongur at leiga av størri lendi til størri anlegg, so sum vindmyllur, aling o.a. er kr. 3,44 pr. $m^2$ (2008 prístalið)

Prístalið árslok 2008 var 117,5 og prísur 3,44 $m^2$. Prístalið 1. ársfjórðing 2013 var 121,6 og verður ásetti leiguprísurin prístalsreguleraður kr. 3,55 $m^2$

Uppskot til leigusáttmála fyriliggur. Sí skjal 2013-0634/6.

**Tilmæli:**
Treytað av at Elfelagið SEV fær øll neyðug loyvi frá øllum viðkomandi myndugleikum, mæla leiðarin á løgdeildini og kommunustjórin til at leiga neyðugt lendi til SEV, til treytir sambært hjálagda leigusáttmála skjal nr. 2013-0634/6.

**Fíggjarnevndin 29. mai 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at góðkenna leigusáttmálan.

**Býráðið 30. mai 2013:** Bogi Andreasen luttók ikki í viðgerðini av málinum.
Einmælt samtykt.

**100/13** **2013-0024**

**Heimildarætlan millum faknevndir og umsiting**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Nývalda býráðið hevur sett sær sum mál at fremja skjótari málsavgreiðslur, og hevur í hesum sambandi tikið avgerð um, at umskipa politiska bygnaðin. Somuleiðis er avgjørt, at heimila umsitingini at avgreiða ein størri part av málum umsitingarliga.

Spurningurin um heimildarbýtið millum faknevndir og umsiting hevur seinastu tíðina verið reistur við jøvnum millumbilum, og var eisini viðgjørdur av býráðnum, sum hin 28. mai 2009 tók avgerð um at taka undir við tilmælinum frá stjórnini um (j. nr. 2009-0381):

1. at býráðið gevur øllum faknevndum eina standandi heimild at útdelegera uppgávur á sínum umsitingarøki, sambært stýrisskipanini og fundarskipanini, til umsitingina at avgreiða

2. at faknevndirnar hvør sær gera eitt skrivligt yvirlit yvir tær heimildir, sum verða útdelegeraðar til umsitingina

3. at faknevndirnar eina ferð árliga lata býráðið og fíggjarnevndina dagført yvirlit yvir tær heimildir, sum eru útdelegeraðar til umsitingina – fyrstu ferð hin 1. apríl 2009 - og annars loypandi um allar broytingar í heimildarætlanunum.

Nú nevndarskipanin fyri tekniska økið er broytt soleiðis, at tær tríggjar nevndirnar byggi- og býarskipanarnevndin, tekniska nevnd og heilsu- og umhvørvisnevndin eru lagdar saman í eina nevnd, við heitinum tekniska nevnd, er neyðugt at endurskoða heimildarætlanina fyri hesa nevndina.

Umsitingin leggur fram uppskot til nýggja heimildarætlan við ásetingum av heimildarbýtinum millum teknisku nevnd og umsitingina.

**Tekniska nevnd 9. januar 2013:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Tilfar við uppskotið til heimildarætlan millum teknisku nevnd og umsitingina, verður sent limunum áðrenn fundin.

**Tekniska nevnd 6. februar 2013:** Útsett.

**Ískoyti:**
Býráðið hevur broytt politiska bygnaðin hjá kommununi, og politisk semja er um at geva umsitingini fleiri heimildir at avgreiða fleiri mál innan politiskt skipaðar karmar. Hetta verður gjørt til tess at tryggja skjótari málgreiðslu og betri umstøður fyri politisku viðgerðunum.

Kommunustýrislógin ásetur, at kommunustýrið skal gera nærri reglur um síni stýrisviðurskifti í eini kommunustýrisskipan, ið m.a. ásetur málsøkini hjá føstu nevndunum.

Kommunustýrisskipanin viðger ikki markamótið millum politikk og umsiting og hvørjar heimildir umsitingin hevur. Einstaka nevndin kann lata sína heimild til umsitingina, t.d. í eini heimildarskipan.

Kommunustýrisskipanin og heimildarskipanin greina markamótini millum býráðið, fíggjarnevndina, føstu nevndirnar og umstingina.

Heimildarskipanin broytir ikki rættin hjá politikarum at krevja mál fyri nevnd ella býráð. Hesin rættur heldur fram sambært galdandi reglum.

Avvarðandi nevnd hevur sum meginregla avgerðarheimild í málum, ið eru prinsippmál innan myndugleika- ella rakstrarøki hjá nevndini. Grundarlagi fyri heimildarskipanini er, at fyrisitingin umsitur tey málsøki, avvarðandi nevnd varðar av sambært kommunustýrisskipanini.

Avgerðarheimildin í einkultmálum er latin til umsitingina soleiðis, at politiska arbeiði og politiska stýringin í størri mun verður at seta mál og gera yvirskipaðar rætningslinjur enn at taka avgerð í einstøkum málum.

Ein latin heimild, kann til eina og hvørja tíð takast aftur, tað eigur tó ikki at ganga móti endamálinum við heimildarskipanni. Heimildin kann tá takast aftur fyri eitt ella fleiri mál, men heimildin innan onnur øki heldur fram óbroytt. Tann, ið letur heimild víðari, tekur avgerð um mørkini fyri heimildini, m.a. hvat, hvussu nógv og hvussu leingi heimildin stendur við og um treytir skulu setast við.

**Tilmæli:**
Stjórnin mælir til at góðkenna uppskotið til heimildarætlan. Somuleiðis verður mælt til at eftirmeta og endurskoða hesa í seinasta lagi í desember 2013.

**Trivnaðarnevndin 25. februar 2013:** Samtykt at taka undir við heimildarætlanini fyri trivnaðarnevndina, tó við teirri viðmerking, at stuðulsupphæddirnar, ið áseta heimildina hjá ávikavist nevndini og umsitingini, skulu samsvara betri við játtanarupphæddina í fíggjarætlanini.

**Mentamálanevndin 27. februar 2013:** Trivnaðarstjórin kunnaði um málið.

**Tekniska nevnd 27. februar 2013:** Tekniski stjórin kunnaði um málið og málið verður tikið uppaftur á næsta fundi.

**Tilmæli:**
Stjórnin mælir til at góðkenna uppskotið til heimildarætlan.

**Vinnunevndin 15. apríl 2013:** Samtykt at taka undir við heimildarætlanini fyri vinnunevndina.

**Tekniska nevnd 16. apríl 2013:** Ein meiriluti, Elin Lindenskov, Sigrún Mohr og Marin Katrina Frýdal, samtykti at taka undir við tilmælinum við hesum broytingum:

1. Nevndin skal hava kunning um umsóknir um lættar frá ásetingum í almennu byggisamtyktini.
2. Umsitingin fær heimild at taka avgerðir í vanligum matrikulmálum.
3. Stuðulsupphæddir, sum umsitingin kann avgreiða, skulu vera lægri enn 10.000 kr.

Ein minniluti, Helena D. á Neystabø og Bogi Andreasen, tekur undir við pkt. 2 og 3 hjá meirilutanum, men við teirri broyting, at umsitingin ikki fær heimild at avgreiða umsóknir um lættar frá ásetingum í almennu byggisamtyktini.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2013:** Útsett.

**Mentamálanevndin 1. mai 2013:** Samtykt at taka undir við heimildarætlanini fyri mentamálanevndin við hesum broytingum:
- Frítíðarskúlar, áseta tænastustøðið: mentamálanevndin tilmælir (rætting)
- Stuðul til tiltøk, verkætlanir og átøk, leiðreglur til stuðulsveiting: fíggjarnevndin ikki kunnast
- Stuðul til rakstur, fastur stuðul: mentamálanevndin tekur avgerð
- Stuðul til íløgur, leiðreglur til stuðulsveiting til íløgur: fíggjarnevndin ikki kunnast
- Leiðreglur av ítróttaranleggum, leiðreglur um nýtslu og útleiging: mentamálanevndin tekur avgerð
- Leiðreglur av ítróttaranleggum, stuðul til leigugjald: fíggjarnevndin ikki kunnast

**Ískoyti**
Til fíggjarnevndarfundin er nýggja heimildarskipanin gjørd við teimum tillagingum, ið nevndirnar hava samtykt.

**Fíggjarnevndin 29. mai 2013:** Samtykt at taka undir við uppskotinum til heimildarskipan viðvíkjandi fíggjarnevndini, og harumframt samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við heimildarskipanini við teimum tillagingum, ið einstøku nevndinar hava samtykt.

**Fíggjarnevndin 30. mai 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til, at umsøkjarar kunnu skjóta umsitingarligar avgerðir í fráviksmálum inn fyri teknisku nevnd.

**Býráðið 30. mai 2013:** Einmælt samtykt

**101/13** **<u>2013-0855</u>**

**<u>Lendisgøtur</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Vísandi til fund hjá borgarstjóranum við umboð fyri ríðifeløgini, Annu og Óla Rubeksen, tann 15. mars 2013, um lendisgøtur, ríði- og varðagøtur í haganum kring Tórshavnar bý og bygdirnar fyri vestan í kommununi.

Kortskjal varð lagt fram vísandi gøtur í Hoyvíkshaga, Húsahaga, Flatnahaga, og í hagunum vestanfyri til Velbastaðar og Kirkjubøar. Kortið vísti støðuna á ymsu teinunum. 9,1 km av góðum gøtum, 17,5 km av gøtum, ið krevja ábøtur og 2,1 km í uppskoti til nýggjar gøtur.

Anna og Óli tosaðu um eitt nýtt slag av ríðikappingum, -cross country-kappingum, ið eru væl umtóktar í grannalondunum, og um hvussu hetta kundi verið eitt munagott íkast til ferðavinnutilboðini í býnum og øllum Føroyum.

Ognarviðurskifti, brúksrættindi, viðlíkahaldsskyldur, kostnaður og fígging, og mangt annað um hetta, varð havt á máli.
Avgerandi er, at eigarin av lendinum gevur loyvi, har sum kommunan ikki eigur, og at ferðslurættindi verða lýst á farleiðina, antin sum servituttur ella onnur avtala.

Góðar lendisgøtur, sum tær kring Vesturvarða og Norðasta Horn, kosta meiri enn 700 kr/m².

Avgjørt varð, at málið skuldi lýsast til fyrstkomandi fund í teknisku nevnd við tilmæli um, at Tórshavnar býráð tekur málið upp, at gera skipanar- og

tilgongdarætlan, við atliti at ognarviðurskiftum, brúksrættindum og viðlíkahaldsskyldum fyri nevndu gøtur, og aðrar líknandi gøtur í allari kommununi. At mælt verður til at seta av 1 mill. at byrja arbeiðið við.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býargartnarin mæla til at taka undir við omanfyri standandi, at gera skipanarætlan v.m. og at beina málið umvegis fíggjarnevndina í býráðið til raðfestingar á íløguætlanini, til tess at byrja verkætlanina.

**Tekniska nevnd 10. apríl 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum at gera skipanarætlan fyri gøtur í allari kommununi og at beina málið, umvegis fíggjarnevndina, í býráðið.

Bogi Andreasen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2013: S**amtykt at taka undir við teknisku nevnd og játta 800.000 kr. av konto 6275, framfluttar løgujáttanir og beina málið í býráðið. Málið kemur fyri aftur á komandi fundi við atliti til meirjáttan.

**Býráðið 2. mai 2013:** Einmælt samtykt

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og fyristitingarstjórin mæla til at broyta samtyktina og játta alla upphæddina 1 mió. kr. av konto 8175

**Fíggjarnevndin 29. mai 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum og broyta býráðssamtyktina og játta alla upphæddina 1 mió. kr. av konto 8175, vegir.

**Býráðið 30. mai 2013:** Einmælt samtykt.

**102/13** **<u>2012-2627</u>**

**<u>Keyp av lendi til rundkoyring á Argjum</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Matr. nr. 36a, Kirkjubøur – Argir. Kommunan skal ogna sær 1.365,7 $m^2$.
Matr. nr. 37a, Kirkjubøur – Argir. Kommunan skal ogna sær 1.485,6 $m^2$.

Kommunan hevur umbiðið virðismeting frá ráðgevandi verkfrøðingi, Kára Lamhauge.

Virðismetingin fyri bæði matriklini er kr. 420 pr. $m^2$, t.v.s. at talan er um eina samlaða virðismeting á uml. 1,2 mill. kr.

Eigararnir av matr. nr. 36a, góðtaka virðismetingina og eru sinnaði at selja lendið fyri kr. 420 $m^2$.

Eigararnir av matr. nr. 37a, góðtaka eisini virðismetingina, men hava aðrar viðmerkingar, sí notat í málinum.

**Tilmæli:**
Leiðarin á løgdeildini og kommunustjórin mæla til at keypa í alt uml. 1.365,7 $m^2$, burtur av matr. nr. 36a og uml. 1.485,6 $m^2$, burtur av matr. nr. 37a, fyri kr. 420,00 pr. fermeturin.

Samlaður keypsprísur verður hereftir uml. kr. 1.197.546,00 og rindar kommunan harumframt matrikuleringsútreiðslur, skeyti og tinglýsing.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2013:** Málið útsett.

**Fíggjarnevndin 29. mai 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum og játta kr. 1.197.546,00 umframt útreiðslur til matrikulering, skeyti og tinglýsing av konto 8175, vegir.

**Býráðið 30. mai 2013:** Einmælt samtykt.

**103/13** **2013-0735 MM**

**Matr. nr. 620ai, og 620ak, Tórshavn.**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Matr. nr. 620ai, Yviri við Strond 7 Vídd 900 $m^2$.
Matr. nr. 620ak, Grannastykki Vídd 900 $m^2$.

Bústaðir, Føroya Bústaðafelag, søkir um at keypa omanfyri nevndu ognir.

Endamálið er at byggja íbúðabygningar við íbúðum til útleigan.

**Tilmæli:**
Leiðarin á løgdeildini og kommunustjórin mæla til at beina málið í teknisku nevnd.

**Fíggjarnevndin 13. mars 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og heita á umsøkjaran um at lýsa ætlanirnar nærri.

**Ískoyti:**
Bústaðir hava tann 6. mars 2013 søkt um at keypa omanfyri nevndu matriklar. Bústaðir siga, at ætlanin er at byggja leigubústaðir. Ætlanin er at byggja ein L-bygning í 2 hæddum og hava teir 2 uppskot um staðseting. Bústaðir ætla at seta onkran arkitekt til at gera uppskot til byggingina. Í umsóknini skriva Bústaðir eisini:

*Vit hava merkt ein stóran tørv á leiguíbúðum, ið eru undir skipaðum viðurskiftum í Tórshavnar kommunu. So at siga dagliga fáa vit fyrispurningar frá fólki, ið ynskja okkurt betur at búgva í. Í dag leiga nógv privat, har húsaleigan ikki stendur mát við kvalitetin á íbúðini. Tí ynskja vit, at byggja sum skjótast við Skansan, men vit ynskja at TK er við frá byrjan og fær sett sítt "fingramerki" á verkætlanina – um hon ynskir tað, soleiðis at Bústaðir kann vera við til at nøkta tørvin á leigubústøðum í høvuðsstaðnum.*

Matr. nr. 620ai og 620ak eru íalt 1.800 m²
Stykkini liggja í 2. Grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, har ásetingarnar eru:

> *2. grundumráði verður alt, sum tað er lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging. Miðstaðabyggingin má einans vera hús, sum heilt ella lutvís verða innrættað til handlar, smáhandverk, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.*

Ásetingarnar "blandaða bústaðar- og miðstaðarbygging" merkir, at bygningar kunnu nýtast til bústaðir og/ella til miðstaðarbygging eftir treytunum omanfyri.

Fleiri aðrar ætlanir hava verið á økinum, m.a.:
Í august 1999 søkti Smyril Line um at keypa ella leiga økið (j.nr. 1999-1706) í tí sambandi gjørdi Albert Isfeld eitt uppskot til bygging av tveimum bygningum í 3 hæddum.
Í september 2000 søkti Eimskip um byggiloyvi, j.nr. 2000-2650.

Grannarnir mótmæltu at bygt vað á økinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggideildini vísa á, at ætlanin er í tráð við ásetingarnar í byggisamtyktini og at tað tí onki er til hindurs fyri at fremja byggiætlanina innanfyri galdandi ásetingar um mest loyvdu bygging v.m. í almennu byggisamtyktini.

**Tekniska nevnd 10. apríl 2013:** Útsett.

**Tekniska nevnd 15. mai 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Kommunan hevur frammanundan samtykt at selja Bústaðir, grundøki á Óðinshædd fyri kr. 156,- pr. fermeturin. ( Sí mál nr. 2002-0627 )

Kommunan søkti tá um loyvi til søluna frá Innlendismálaráðnum.

**Loyvi frá Innlendismálaráðnum.**
Sambært svarðskrivi frá Innlendismálaráðnum dagfest 11.04.2013, framgongur, sí brot úr brævinum: ( 2002-0627/40)

***Søla av kommunalari fastogn***
*Sambært kommunustýrislógini § 44, stk. 1 má føst ogn hjá kommununi ikki seljast uttan so, at ognin frammanundan hevur verið boðin út alment. Tó kann landsstýrismaðurin áseta nærri reglur um, at ávísar ognir kunnu undantakast almennum útboði.*
*Í kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn hevur landsstýrismaðurin ásett, í hvørjum førum kommunal fastogn ikki nýtist at verða boðin alment út við sølu. Sambært § 2, stk. 1 nr. 1 í hesi kunngerð nýtist kommunal fastogn ikki at verða boðin alment út, tá talan er um sølu til landsmyndugleikar, kommunu ella kommunalan felagsskap.*

*Bústaðir - Føroya Bústaðarfelag - er ein almennur grunnur stovnaður við fyriskipan av landsmyndugleikunum og er at meta sum ein sjálveigandi landsstovnur. Í løgtingslóg nr. 62 frá 31. mai 2010 um Húsalánsgrunnin sæst, at Bústaðir - Føroya Bústaðarfelag - er nær tengt at landsmyndugleikunum.*
*Innlendismálaráðið hevur viðgjørt umsóknina og er komið til ta niðurstøðu, at søla av kommunalari fastogn til Bústaðir – Føroya Bústaðarfelag - kann javnsetast við sølu av kommunalari fastogn til landsmyndugleikar.*

*Tórshavnar kommuna kann tí, smb. § 2, stk. 1, nr. 1 í kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn, selja grundøkini matr nr. 1318 a og matr. nr. 1319b til Bústaðir - Føroya Búðstaðarfelag - uttan at ogninar verða boðnar út alment.*

Til prísin viðmerkir Innlendismálaráðið

*Tórshavnar kommuna upplýsir í skrivinum, at kommunan ynskir at selja grundøkini matr. nr. 1318 a og matr. nr. 1319b fyri 156,00 kr. fermeturin til Bústaðir – Føroya Bústaðarfelag. Talan er sostatt um, at prísurin fyri grundøkini allarhelst liggur niðanfyri marknaðarprís.*

*Við tí í huga, at kommunan hevur eitt ávíst rásarúm at áseta prísin við sølu av kommunalari fastogn uttan alment útboð, at kommunan hevur ein konkretan*

*sakligan kommunalan áhuga í at stuðla endamálinum við byggingini og við teimum fortreytum, at Tórshavnar kommuna tryggjar sær, at tann kommunali áhugin verður røktur í samband við søluna av grundøkinum til Bústaðir – Føroya Bústaðarfelag - hevur Innlendismálaráðið ongar viðmerkingar til prísin.*

**Treytir í skeytinum.**
Skeytið verður áteknað servituttbindandi við eini áseting um 2 ára byggifreist, frá tinglýsingardegi, og at grundstykkið kann fella aftur til kommununa, móti at uppruna keypspeningurin uttan rentur verður afturgoldin. Fellur grundstykkið aftur av hesi orsøk, og keyparin hevur byrjað bygging, kann hann fáa prógvaðar útreiðslur endurgoldnar uttan rentur í tann mun, tað gjørda arbeiðið kemur seljaranum ella øðrum keypara av sama grundstykki til góðar.

**Tilmæli:**
Leiðarin á løgdeildini og kommunustjórin mæla til at selja Bústaðir – Føroya Bústaðarfelag

Matr. nr. 620ai, Yviri við Strond 7, vídd 900 m², og matr. nr. 620ak, vídd 900 m².
fyri kr. 156 kr. fermeturin.

Keyparin rindar allar útreiðslur til tinglýsing v.m.

**Fíggjarnevndin 29. mai 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at boða umsøkjaranum frá, at kommunan er sinnað at geva temum ein framíhjárætt í tvey ár at keypa økið.

**Býráðið 30. mai 2013:** Einmælt samtykt.

**104/13** **2012-2590 HH**

**Pauli Dam Joensen søkir um at keypa part av matr.nr. 119, eigari er Tórshavnar kommuna**

**Málslýsing - samandráttur**
Pauli Dam Joensen, ynskir at keypa uml. 120 m$^2$, burtur av matr. nr. 119 hjá Tórshavnar kommunu, at leggja saman við egið matrikul nr. 121, Argjavegur 8A, Argir.

Húsini á matr. nr. 121 liggja yvir um mark, og ynskir eigarin at kunna keypa økið, soleiðis at húsini liggja inni á egnum matrikli.

**Tilmæli:**

Leiðarin á løgdeildini og kommunustjórin mæla til at beina málið í teknisku nevnd.

**Fíggjarnevndin 13. februar 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Á matr. nr. 119 stóðu eini hús, sum vóru samanbygd við húsini á matr. nr. 121 hjá Paula Dam. Kommunan ynskti húsini burtur, tí tey komu út á vegin og í tí sambandi keypti kommunan ognina. Uml. 2/3 av húsinum er tikið burtur, meðan 1/3 er eftir sum partur av ognini hjá Paula Dam.

Kommunan hevur ongar ætlanir við matr. nr. 119.

Pauli Dam hevur í samráð við byggideildina gjørt uppskot til loysn, har hann keypir ein part av matr. nr. 119 (merkt við reyðum á korti) og rest verður lagt sum parkering ella fríøki (merkt við gulum á korti).

Víst verður til kortskjal, okkara j.nr. 2012-2590.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggideildini mæla til at ganga umsóknini á møti at selja tann partin av matr. nr. 119 sum ikki er vegur til Paula Dam Joensen, treytað av at stykkið verður matrikulerað saman við matr. nr. 121.

**Tekniska nevnd 15. mai 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Tilmæli:**
Leiðarin í løgdeildini og kommunustjórin mælir til at selja tann partin av matr. nr. 119 sum ikki er vegur til Paula Dam Joensen, treytað av at stykkið verður matrikulerað saman við matr. nr. 121.

Keypsprísur samsvarandi útstykking Hoyvíkshagin Suður kr. 672,- pr. fermetur.

Keyparin rindar allar útreiðslur til frámatrikulering og samanlegging.

**Fíggjarnevndin 29. mai 2013:** Samtykt at mæla býráðnum at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 30. mai 2013:** Einmælt samtykt.

**105/13** **2012-2567 GS**

**Útbygging á Berjabrekku 88, uttan fyri byggiøkið til íbúðir**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Umsókn er komin frá Jóannes Dalsgarð, dagfest 30.10.2012, um loyvi at byggja út á omanfyri nevndu ogn. Søkt verður um frávik frá ávísingunum um útbygging á Berjabrekku á norðursíðuni.

Grundin til útbyggingina er grundað á, at húsið skal gerast handikappavinarligt.

**Lógir, ásetingar o.a.:**
Økið liggur í umráðispartinum A1 í 3. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

**Upplýsingar frá umsitingini:**
Umsóknin umfatar útbygging av suðursíðuni og norðursíðuni. Byggingin á suðursíðuni er ein útbygningur, ið kemur 1,2 m út og er eftir allari longdini á húsinum. Hetta er innafyri treytirnar í skeyti og viðtøkunum fyri eigarafelagið um útbygging. Á nordursíðini er eisini ætlanin at byggja eftir allari longdini 1,8 m út og 3 m eftir longdini og síðan 1,1 m út og 4 m langt. Sambært skeyti og viðtøkunum fyri eigarafelagið ber til at byggja 2,4 m út og 3 m langt móti øðrum grannanum. Tvs. søkt verður um frávik fyri teir 4,4 m². (1.1 m og 4 m langt) tilsaman. Bygningurin, har frávik verður søkt um, verður undir trappuplattinum hjá yvirbúgvanum, tvs. at allir bygningurin má verða brunatryggur.

Íbúðin verður 61,44 m², har mest loyvda vidd á íbúð kann verða 59,76. m².

Umsóknin er ikki í tráð við byggisamtyktina.

**Frávik:**
Umsóknin inniber fylgjandi frávik:
**1):** At útbygt verður á norðursíðuni eftir allari longdini, har 4,4 m² (1,1 m x 4 m) eru út yvir tað, sum loyvt er. Økið har útbygningurin verður er á felagsøki.

**Umhvørvisárin:**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1.

**Fíggjarligt:**
ongar bindingar fyri kommununa.

**Viðmerkingar frá øðrum:**
Málið er sent til grannahoyring hjá 5 grannum og hjá Eigarafelagnum Berjabrekka 2, og hoyringin var liðug tann 7 mai 2013.

Eingi mótmæli eru komin frá grannunum.

Eigarafelagið viðmælir útbyggingini, sum er innanfyri treytirnar í skeytinum og kann í hesum heilt serliga føri viðmæla at loyvi verður givið til umrødda frávik, svarandi til at bygt verður 4,4 m² undir trappuplattinum, sum tó ikki frameftir eigur at hava presedens við sær í møguligum øðrum málum.

**Skjøl:**
Umsókn j.nr.2012-2567/1
Tekningar,j.nr. 2012-2567/3 og 4
Fráviksskjal, j.nr. 2012-2567/7

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggideildini mæla til at loyva útbyggingini, sum liggur innanfyri ásetingarnar í skeytinum, men at útbyggingin undir trappuplattinum ikki verður gingin á møti, vísandi til at hetta kann skapa siðvenju fyri onnur mál á Berjabrekku.

**Tekniska nevnd 15. mai 2013:** Ein meiriluti, Bogi Andreasen, Jógvan Arge og Helena D. á Neystabø, samtykti at mæla fíggjarnevndini til at víkja frá skeytistreytunum soleiðis, at umsóknin kann gangast á møti grundað á serligar umstøður og at einki mótmæli er komið frá grannunum.

Ein minniluti, Elin Lindenskov og Halla Samuelsen, tekur undir við tilmælinum og krevur málið í býráðið.

**Fíggjarnevndin 29. mai 2013:** Málið verður lagt fyri býráðið.

**Býráðið 30. mai 2013:** Málið beint í fíggjarnevndina.

**106/13** **<u>2012-0377 HH/JEH/løgd.</u>**

**<u>Umsókn frá SEV um keyp av matr. nr. 1c, Sund, í sambandi við ábøtur og útbygging av Sundsverkinum</u>**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Sev søkir um at kunna keypa eitt øki á Sundi, sí hjálagda kort skjal nr. 2012-0377/1. burtur av matr. nr. 1c á Sundi.

**Økið sum er litað við gulum. ( uml. 8.600 fermetrar )**

SEV greiðir frá at ætlanin er at fara undir eina dagføring av tangagarðinum í vár, og til tað er neyðugt at teir fáa tað økið sum á kortinum er litað gult.

**Økið sum er litað við grønum. ( uml. 4.600 fermetrar )**
SEV greiðir frá, at framtíðarætlanin umfatar eina nýggja orkustøð, og at SEV tá fær brúk fyri lendinum niðan fyri atkomuvegin eystur móti matrikli nr. 1b. (Grøna økið á kortinum).

SEV ynskir at kunna keypa alt økið beinanvegin, men kann um neyðugt bíða við tí eystara
(grøna) partinum.

**Tilmæli:**
Leiðarin á starvsfólka- og løgdeildini og miðfyrisitingarstjórin mæla til at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina og í havnarnevndina.

**Fíggjarnevndin 21. mars 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum umframt, at málið eisini verður beint í heilsu- og umhvørvisnevndina.

**Ískoyti:**
Heilsu- og umhvørvisdeildin hevur viðgjørt umsóknina um byggiloyvi til dagføring av tangagarðinum á Sundsverkinum, j. nr. 2012-0286/6.
Viðmerkingarnar eru hesar:

- Tangagarðurin skal rúma somu nøgd sum størsti tangin á Sundsverkinum. Hetta er eisini ein av góðkenningartreytunum í umhvørvisgóðkenningini (6.6.2.). Hædd skal takast fyri møguligari framtíðar útvegan av størri tanga enn honum, ið størstur í dag.
- Annars verður sett sum treyt, at allar ásetingar í kunngerð nr. 84 frá 2. juli 2010 um bunkring, flutning av olju o.a. verða hildnar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin fyri heilsu- og umhvørvisdeildini mæla til at ganga umsóknini á møti undir omanfyri nevndu treytum, umframt at SEV teknar nøktandi trygging ímóti møguligari oljudálking.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 24. apríl 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum

**Ískoyti 27.09.2012:**
Økið har SEV hevur ætlanir um at byggja út til dagføring av tangagarðinum, hevur higartil verið leigað út til Búnaðarstovuna, sum í samstarvi við bóndan á Sundi, hevur havt eina royndarverkætlan við berjarunnum á økinum.

Búnaðarstovan hevur nú boðað frá, at teir ikki ynskja at halda áfram við leigumálinum, og flytir Bóndin á Sundi av økinum innan góðan mðr.

Byggimálið hjá SEV, sum umfatar eina dagføring av tangagarðinum, er um at verða klárt, og fyriliggja øll loyvi frá avarðandi myndugleikum, herundir eisini friðingarnevndini, men kann kommunan ikki skriva út byggiloyvi, fyrr enn ognarviðurskiftini eru avgreidd.

Kommunan hevur skyldu at ávísa SEV øki. Grein 10 í viðtøkunum fyri Elfelagið SEV er soljóðandi: “Hvør limakommuna letur innanfyri kommunumark felagnum ókeypis til handa tað vídd, ið tørvar til háspennings- og lágspenningsleiðingar, transformarastøðir og til vegir til støðirnar”.

Í fyrsta umfari hevur SEV. tørv á uml. 8.600 fermetrum.

**Ískoyti:**
Samráðingar eru í løtuni við SEV. Um eitt úrslit fyriliggur áðrenn fundin, kemur tilmælið til fundin).

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. desember 2012:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 5. desember 2012:** Útsett.

**Ískoyti:**
SEV hevur boðað frá, at møguleiki kortini ikki verður at gera makaskifti við gamla el-verkið í Gundadali, av tí at tað ikki hevur eydnast teimum at finna annan bygning í staðin. SEV hevur tí biðið um, at umsóknin um lendi til tangagarðin inni á Sundi verður viðgjørt og avgreitt.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin vísir til samtyktina í heilsu- og umhvørvisnevndini 24. apríl 2012. Mælt verður tó til, at lendið verður avmarkað til bert at fevna um tann partin sum neyðugur er til tangagarðin. Somuleiðis verður mælt til at heita á fíggjarnevndina um í eini søluavtalu við SEV at gera avtalu um at venda aftur til upprunaligu ætlanina um makaskifti fyri restina av lendinum við gamla el-verkið í Gundadali, tá SEV hevur funnið onnur hóskandi hølir at flyta virksemið í Gundadali í.

**Tekniska nevnd 15. mai 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

Bogi Andreasen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 29. mai 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 30. mai 2013:** Bogi Andreasen luttók ikki í viðgerðini av málinum. Einmælt samtykt.

**107/13** **<u>1999-1665 BH</u>**

**<u>Rúni Persson: Áheitan um at kommunan ger ábøtur á vegastrekkið í Áargeil og um kommunan ikki eigur vegin, so sum hon hevur upplýst, so at kommunan yvirtekur hetta vegastrekkið - matr. nr. 1412a, Tórshavn</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í skrivi, dagfest 3. august 1999, heitir Rúni Persson á Tórshavnar býráð, um at vegastrekkið oman til Áargeil verður liðugtgjørt.

Vegurin er privat ogn hjá Niels Persson, og umsøkjarin biður tí um yvirtøku av vegnum.

Tekniska umsiting hevur í skrivi, dagfest 8. september 1999, boðað frá, at um vegastrekkið á matr. nr. 1412<u>a</u> lýkur treytirnar fyri møguligari yvirtøku, verður málið lagt fyri teknisku nevnd.

**Tekniska nevndin 27. september 1999:** Samtykt at taka undir við umsitingini.

Schumann Hjaltalin ynskir greiðar reglur fyri yvirtøku av privatum vegi.

- Rúni Persson kemur á fundin at greiða frá gongdini í málinum.

**Tekniska nevndin 30. juni 1999:** Rúni Persson og Niels Persson vóru á fundi og greiddu frá.

Samtykt at yvirtaka vegin, tá eigaraviðurskiftini eru komin uppá pláss, og kommunan hevur tryggjað vegin.

**Ískoyti:**
Síðani málið um yvirtøkuna av Áargeil er viðgjørt í teknisku nevnd eru ymisk viðurskifti komin fram í ljósmála, sum eiga at fáa eina nýggja viðgerð.

Sum kunnugt tók tekniska nevnd 30. juni 2000 (og ikki í 1999) avgerð um at yvirtaka vegin, tá eigaraviðurskiftini eru komin uppá pláss, og kommunan hevur tryggjað vegin. Í framhaldi av samtyktini í teknisku nevnd at fáa yvirtikið Áargeil, vóru atkomuviðurskiftini ovast uppi í Hvannkróki ikki nøktandi, og tí vildi umsitingin fegin fingið loyst hetta saman við Rúna Persson. Neyðugt var at gera ein betonggarð á vestursíðuni á ognini hjá Rúna Persson, soleiðis at vegurin fram við áarlokinum ikki rapaði. Gjørd var ein avtala j. nr. 1999-1665/10, dagf. 16. november 2000, sum gekk út uppá, at í sambandi við málið um yvirtøku av Áargeil, skuldi avtala gerast um at matr. nr. 1412d, Tórshavn, eigari Rúni Persson, skuldi lata øki av á vestaru síðu móti Hvannkróki ísv. dagføringina av vegnum. Afturfyri skuldi sami matrikul, matr. nr. 1412d, Tórshavn fáa uml. 30 fermetrar

av Áargeil, matr. nr 1412a. Hetta vildi sostatt ført við sær, at vegurin Áargeil vildi enda sum blindur vegur uttan vendipláss.

Tað framgongur ongastaðni í málslýsingini, um málið hevur verið í býráðnum, men umsitingarliga arbeiðið hevur verið sum um málið er avgreitt í býráðnum. Rættiliga drúgv tíð er frágingin at fáa matrikuleru viðurskiftini í rættlag og ikki fyrr enn í januar 2012 eru formellu viðurskiftini viðv. yvirtøkuni av Áargreil komin í rættlag. Hetta eftir at Maren K. T. Elisabeth Persson (einkjan eftir Niels Persson) hevur undirskrivað endaligu avhendingina 12. januar 2012 (skjal j. nr 1999-1665/23).

Rúni Persson hevur í sambandi við yvirtøkuna sett seg í samband við umsitingina og greitt frá, at hann metir at gjørda avtalan skal haldast. Víst verður í hesum sambandi til innanhýsis fundarfrásøgn j. nr 1999-1665/24.

**Tilmæli:**
Fyri at fáa útvegað Rúna Persson uml. 30 fermetrar av 1412a, Tórshavn (Áargeil) og kommununi uml. 30 fermetrar av ognin hjá Rùna Persson, matr. nr. 1412d, Tórshavn, mæla tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin til at ganga umbønini á møti.

**Tekniska nevnd 15. mai 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 29. mai 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 30. mai 2013:** Einmælt samtykt.

**108/13** **<u>2013-0884 KF</u>**

**<u>Uppskot til broyting av byggisamtyktini fyri Kollafjørð fyri Hamrabøin, matr. nr. 91a í Kollafirði</u>**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Tórshavnar kommuna hevur síðani kommunusamanleggingina við Kollafjørð gjørt nógv uppskot til útstykkingar til sethús og nógvar royndir at fáa fatur á byggilendi til sethúsaútstykkingar, men hvørja ferð hevur tað víst seg at verða trupulleikar við at fáa fatur á lendinum.

Í 2004 var ætlanin at gera eina lítla útstykking á 6 grundstykkir á parti av matr. nr. 91a í Kollafirði (j.nr. 2004-0714), men heldur ikki her bar til at fáa fatur á

byggilendinum. Men nú hevur Poul Adrian í Homrum, festibóndi, boðið kommununi at keypa Hamrabøin matr. nr. 91a, grundað á at hann ikki longur hevur mjólkineyt og bøurin tí ikki verður røktur. Avtalað varð, at TK ger eitt uppskot og vendir aftur til Búnaðarstovuna og Poul Adrian í Homrum.

Ein lítil partur av ognini liggur í A1- sethúsaøki og restin liggur í D1-øki og 4 gr. Býarskipanardeildin hevur gjørt eitt uppskot til broyting av byggisamtyktini og útstykking av økinum til 23 grundstykkir.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at almenna byggisamtyktin verður broytt sambært kortskjali, dagfest 1. mai 2013.

**Tekniska nevnd 15. mai 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

Somuleiðis avgjørdi nevndin at heita á fíggjarnevndina at søkja Búnaðarstovuna um at keypa matr. nr. 91a.

**Ískoyti.**
Kommunan hevur havt samráðingar við Búnaðarstovuna um keyp av lendi, sí omanfyri.

Búnaðarstovan er sinnað at selja kommununi lendið. Og skal kommunan rinda ásettan prís, sambært kunngerð um festi og harumframt endurgjald fyri fjósið.

Sí notat 2013-0884/4

**Tilmæli.**
Leiðarin á løgdeildini og kommunustjórin mæla til, at keypa lendið við ástandandi fjósi. Keypið verður játtað av konto 6175.

**Fíggjarnevndin 29. mai 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum og játta pening til keyp av lendi av konto 6175, keyp av lendi.

**Býráðið 30. mai 2013:** Einmælt samtykt.

**109/13** **2009-2838 MJA**

**Býarskipanardeildin. Miðbýarætlanir**

**Lýsing og samandráttur av málinum:**

fyri vegir, torg og pláss í miðbýnum í Tórshavn. Uppskotini eru gjørd í sambandi við ítøkiligar ætlanir sum til dømis skipan av ferðslu í miðbýnum, Býarskipanardeildin hevur seinasta árini gjørt fleiri uppskot til verkætlanir broyting av byggisamtykt fyri Dr.Jacobsensgøtu, umvæling av Reinsarínum, skipan av ferðslu og parkering á Kongabrúnni v.m.
Uppskotini eru nú samlað saman og verður við hesum lagt fram sum myndatalvir.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 9. november 2009:** Býararkitekturin kunnaði um málið.

**Ískoyti:**
Í sambandi við íløguætlanina fyri 2013 eru avsettar kr. 2 mió. til miðbýarætlan. Formansskapur býráðsins hevur umrøtt málið og ynskir at gongd nú verður sett á fyrireikingararbeiðið. Í hesum sambandi ynskir formansskapurin at biðja um kr. 500.000 til at gera skitsuuppskot og kostnaðarmeting fyri økið kring Mylnugøtu við støði í øðrum hugskotum, sum kommunan hevur arbeitt við fyri hetta økið eins og hugskotum frá privatum borgarum.

**Tilmæli:**
Formansskapurin mælir til at játta kr. 500.000 av kto 6275, til at seta ráðgeva at gera skitsuuppskot og kostnaðarmeting at leggja fyri nevnd og býráð, sambært omanfyri standandi, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 15. mai 2013:** Ein meiriluti, Elin Lindenskov, Helena D. á Neystabø, Halla Samuelsen og Jógvan Arge, samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Bogi Andreasen, mælir frá at játta kr. 500.000 og at seta ráðgeva, fyrr enn býráðið hevur umrøtt málið.

**Ískoyti:**
Víst verður til notat í málinum, dagfest 28. mai 2013, har víst er á, at fyri at koma víðari við málinum at arbeiða við loysnum fyri viðurskiftini í miðbýnum, er neyðugt at viðgera miðbýin bæði sum eina heild og harumframt at gera neyvari uppskot til loysnir á teimum einstøku økjunum, har tað tænir endamálinum at fáa ein vælvirkandi miðbý.

Somuleiðis verður í nevnda notati víst á, at tað er eisini ein avgerðandi fortreyt, at ein slík ætlan fær eina høga politiska og fíggjarliga raðfesting.

**Tilmæli:**
Á omanfyri standandi grundarlagi, mæla kommunustjórin, miðfyrisitingarstjórin og tekniski stjórin til fylgjandi handlingsætlan:
1. At seta ein politiskt/fyrisitingarligan stýrisbólk at hava yvirskipaðu ábyrgdina av ætlanini.
2. At seta ein fyrisitingarligan/fakligan arbeiðsbólk at standa fyri arbeiðinum.

3. At bjóða arkitektum til eina work-shop í ein ella tveir dagar at viðgera miðbýarproblematikkin og at koma við hugskotum til, hvat ein miðbýarætlan skal innihalda.
4. At velja út hvørji innsatsøkini skulu vera, og at gera eina raðfylgju nær tey ymsu økini skulu gerast.
5. At bjóða vinnurekandi og øðrum áhugaðum til eina "miðbýar-workshop" at greiða frá pkt. 3 og 4 og at koma viðmerkingum og ynskjum.
6. At fyrireika og útskriva eina hugskotskapping millum arkitektarnar, sum bæði skal fevna um eina heildarætlan fyri miðbýarøkið, og neyvari hugskot fyri tey valdu innsatsøkini og í hesum sambandi at játta kr. 1 mió til fyrireiking av kappingartilfari og samsýningar av avsetta peninginum á fíggjarætlanini fyri 2013 á konto 6275.
7. Beinanvegin eftir lokna hugskotskapping, at gera eina fyribils kostnaðarmeting og raðfesting á langtíðar íløguætlan kommununar samsvarandi teirri í pkt. 4 nevndu raðfesting.
8. Somuleiðis stutt eftir lokna hugskotskapping, at gera projekteringssáttmálar fyri vinnandi loysnirnar um at gera fullfíggjað prosjektir at leggja til grund fyri myndugleikagóðkenningum og útbjóðing av arbeiðum.

**Fíggjarnevndin 29. mai 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 30. mai 2013:** Einmælt samtykt.

**110/13** **<u>2013-0315</u>**

**<u>Vinnuøki á Skarðshjalla</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Umsitingin greiddi frá um málið viðv. eftirspurningi og kostnaði av liðugtgerð.

**Vinnunevndin 4. februar 2013:** Samtykt at umsitingin kannar kostnaðarmetingina og áhugan hjá møguligum keyparum at leggja fyri nevndina aftur.

**Ískoyti:**
Á umsøkjara listanum til vinnugrundøkir í Tórshavnar kommunu, standa í løtuni einans 8. umsøkjarar í umhvørvisflokki 3–4 og 5, og sum eisini hava goldið depositum kr. 25.000,00.

Løgdeildin hevur spurt hesar umsøkjarar um teirra áhuga í møguligum keypi av grundstykkjum, sum eru til víddar millum 790 $m^2$ og 2.000 $m^2$ á Skarðshjalla, um stykkini verða seld fyri ein prís sum verður áleið kr. 800 pr. $m^2$

Allir nevndu umsøkjarar hava fingið teldubræv, og hevur løgdeildin hoyrt aftur frá 6 av umsøkjarunum.

Tveir av umsøkjarunum eru áhugaðir, harav tann eini bert er áhugaður um hann kann fáa eitt stykkið sum er til víddar uml. 500 $m^{2.}$

Tveir av umsøkjarunum hava boðað frá, at teir ikki eru ikki áhugaðir, og skulu tveir umsøkjarar hugsa um tað og venda aftur.

Niðurstøðan er at talan er um lítlan áhuga millum verandi umsøkjarar.

Kommunan eigur tó at kanna møguleikan fyri at fremja útstykkingina, og at selja stykkini til marknaðarprís, við einum ásettum minstaprísi.

**Vinnunevndin 15. apríl 2013:** Kunnað varð um málið.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2013:** Samtykt at bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión og at leggja fyri aftur til politiska støðutakan.

**Vinnunevndin 21. mai 2013:** Nevndin samtykti at mæla býráðnum til at gera atkomuna lidna.

**Ískoyti:**
Kommunstjórin og leiðarin á løgdeildini mæla til at bjóða arbeiðið út og játta neyðugu upphæddina til arbeiðið av konto 6975, ið verður fíggjað av konto 6175, umsiting og røkt av fastari ogn. L61021, søla av jørð. Arbeiðið er mett at kosta kr. 4.730.000,00.

**Fíggjarnevndin 29. mai 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðið 30. mai 2013:** Einmælt samtykt.

**111/13** **2013-1320**

**Kunning um vetrarfriðing og tyrvingarpláss**

Umsitingin kemur á fundin at greiða frá vetrarfriðing í ymisku økjunum, um møguleikar, avleiðingar og kostnað.

Eisini verður greitt frá tyrvingarplássum í økjunum, um møguleikar og tørv.

**Økisnevndin 21. mai 2013:** Nevndin samtykti at fáa umsitingina inn at greiða frá málinum um vetrarfriðing í ymisku økjunum og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina um undirtøka er fyri at fara víðari við málinum.

**Fíggjarnevndin 29. mai 2013:** Fíggjarnevndin samtykkir at mæla býráðnum til at taka undir við, at økisnevndin arbeiðir víðari við vetrarfriðing í bygdunum.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðið 30. mai 2013:** Einmælt samtykt.

**112/13** **2006-3283 BH**

**Brúgvin um Sandá**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Vísandi til málsgongd í málinum j. nr. 2001-0695, við býráðssamtykt av 22. mai 2003, hevur umsitingin umrøtt málið og er av tí fatan, at umráðandi er at kanna aðrar møguleikar fyri tilgongd til málið.

Umsitingin mælir tískil til at leita ráðgeving hjá serfrøðingum innan brúgvabygging við tí fyri eyga at fáa til vega hóskandi byggilistarligt snið, teknisk og fíggjarliga forsvarlig brúgvagerð, sum samstundis líkar krøvini hjá friðingarmyndugleikunum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at játtaðar verða 500.000 kr at gera arbeiðs- og byggiskrá við tilhoyrandi skitsuuppskoti til støðutakan, vísandi til mannagongd fyri verkætlanum hjá Tórshavnar kommunu.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 30. oktober 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 8. november 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at játta kr. 500.000 av íløgum.

**Býráðið 16. november 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Val av býráðslimum til bygginevnd fyri Brúnna um Sandá sambært § 36 í kommunustýrislógini

**Býráðið 27. september 2007:** Valdir vóru Jógvan Arge og Sjúrður Olsen.

**Ískoyti:**
Umval av býráðslimum í bygginevndina Brúgv um Sandá sambært § 36 í kommunulógini.

**Býráðið 26. november 2009:** Valdir vórðu Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen.

**Ískoyti:**
Sambært yvirliti yvir arbeiði fíggjað av íløgum fyri 2009 (skjal nr. 2009-2360/1), eru markaðar kr. 1.000.000,- til fyrireikingararbeiði viðv. Brúnni um Sandá, sum partur av langtíðaríløguætlan kommununar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at játta avsettu upphæddina á kr. 1.000.000,- til framhaldandi projektering og fyrireikingar, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 3. desember 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Fíggjarnevndin 9. desember 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 17. desember 2009:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur á fundum viðgjørt spurningar til framhaldandi projektering av brúnni og í sambandi við fyrireikingarnar fer nevndin m.a. at mæla til, at arbeiðið hjá nevndini eisini skal fevna um vegastrekkini báðumegin sjálva brúnna.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka undir við tilmælinum í fundarfrásøgn nr. 7 (j. nr. 2006-3283/23) og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 29. apríl 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 12. mai 2010:** Borgarstjórin var ikki við til viðgerðina av hesum máli.

Tekniski stjóri greiddi frá málinum.

Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum í fundarfrásøgn nr. 7 (j. nr. 2006-3283/23) soleiðis, at arbeiðið hjá bygginevndini eisini kemur at fevna um vegastrekkini báðumegin brúnna um Sandá.

**Býráðið 20. mai 2010:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Í framhaldi av tilgongdini av projektering av brúnni, hevur bygginevndin á fundi 4. november 2010 viðgjørt spurningin um innihaldið í einum byggiprogrammi og hvør skal bjóða uppá hetta arbeiðið. Byggiprogrammið skal fevna um:

1. Stutt frágreiðing um byggimálið
2. Almenna endamálsorðing
3. Myndugleikagóðkenningar og galdandi reglugerðir
4. Stødd á brúgv ella frágreiðing um faktisk teknisk viðurskifti.
5. Tann bjóðandi skal definera kriteriið fyri design av brúnni.
6. Hædd skal verða tikin fyri samlaðari last á brúgv – herundir neyðugu lastkombinatiónir innan galdandi normum.
7. Hædd skal verða tikin fyri geotekniskum kanningum á staðnum.
8. Frágreiðing um bygging, logistik o.a. í hesum sambandi
9. Tekniskar veitingar
10. Evt. onnur útgerð
11. Tíðarætlan og kostnaðarmeting av brúnni
12. Kostnaður/tilboð fyri byggiprogrammið
13. Tíðarfreistin at gera byggiskránna er 6 vikur.

**Tilmæli:**
Bygginevndin mælir til at:

1. Taka undir við uppskotinum um byggiprogram sambært fundarfrásøgn nr. 8 skjal nr. 2006-3283/29.
2. Biðja p/f LBF og EFLA h/f um at koma við tilboði upp á byggiprogram.
3. Beina málið, um byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina, í býráðið til kunningar.

**Tekniska nevnd 2. desember 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina.
Levi Mørk var ikki við til viðgerðina av hesum máli.

**Fíggjarnevndin 8.desember 2010:** Málið umrøtt. Verður tikið upp aftur á einum seinni fundi.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur á fundi hin 18. januar 2011 viðgjørt málið av nýggjum, og mælir til fylgjandi at leggja fyri teknisku nevnd, fíggjarnevnd og býráð.

**Tilmæli:**
Bygginevndin mælir til:
1. At umsitingin við neyðugari hjálp frá ráðgevum, ger uppskot til byggiskrá at leggja fyri bygginevndina, faknevdir og býráð innanfyri 6 vikur.
2. At byggiskráin tekur útgangsstøði í samtyktini í bygginevndini hin 4. november 2010
3. At talan skal verða um betongbrúgv
4. At arbeiðið verður boðið út í innbodnari heildararbeiðstøku millum upp til 5 heildararbeiðstakarar eftir uppskoti frá umsitingini
5. At hvør tilboðsgevari kann lata inn upp til 2 uppskot
6. At umsitingin ger uppskot til dømingarkriteriir og dómsnevnd at leggja fyri bygginevndina, faknevdir og býráð innanfyri 6 vikur.
7. At játta kr. 1,0 mió. av íløgum fyri 2010, og kr. 2,0 mió. av íløgum fyri 2011 og kr. 400.000,00 av lokaðum verkætlanum á tekniska økinum.

**Fíggjarnevndin 19. januar 2011:** Samtykt at beina málið í teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndina.

**Tekniska nevndin 20. januar 2011:** Ein meirluti, Marin Katrina Frýdal, Sjúrður Olsen, Halla Samuelsen og Levi Mørk, samtykti at taka undir við tilmælinum hjá bygginevndini og at beina málið í býráðið um byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina.
Ein minniluti, Jákup Símun Simonsen, tekur undir við tilmælinum við teirri broyting, at pkt 4: *'at arbeiðið verður boðið út í innbodnari heildararbeiðstøku millum føroysk virki'.*

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. januar 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá bygginevndini.

**Ískoyti:**
Vísandi til pkt. 7 í tilmælinum til fíggjarnevndina hin 19. januar 2011, er av misgávum komið skeivt tal at standa um játtanina á kr. 2,0 mió. av íløgum fyri 2011. Rættað talið er kr. 2,6 mió., sambært íløguætlan kommununar fyri 2011. Tískil verður mælt til at broyta hetta sambært niðanfyristandandi tilmæli

**Tilmæli:**
Vísandi til íløguætlan kommununar fyri 2011, mæla miðfyrisitingarstjórin og tekniski stjórin fíggjarnevndini og býráðnum til at taka undir við meirilutanum í

teknisku nevnd 20. januar 2011 og byggi- og býarskipanarnevndini 26. januar 2011, við hesi broyting av pkt. 7:

7. At játta kr. 1,0 mió. av íløgum fyri 2010, og kr. **2,6** mió. av íløgum fyri 2011 og kr. 400.000,00 av lokaðum verkætlanum á tekniska økinum.

**Fíggjarnevndin 27. januar 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við meirilutanum í teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndini við hesi broyting av pkt. 7: At játta kr. 1,0 mió. av íløgum fyri 2010, og kr. **2,6** mió. av íløgum fyri 2011 og kr. 400.000,00 av lokaðum verkætlanum á tekniska økinum.

**Býráðið 27. januar 2011:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin leggur fram tilboð frá ráðgevum um byggiætlan til heildararbeiðstøku.

**Tilmæli:**
Vísandi til at bert eitt tilboð kom inn, mælir býarverkfrøðingurin til at taka av tilboðnum, sent við teldubrævi tann 4. Apríl 2011 frá P/F LBF áljóðandi kr. 148.000.

**Tekniska nevnd 5. apríl 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 6. apríl 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og taka av tilboðnum Frá 4. apríl 2011 frá P/f LBF áljóðandi kr. 148.000.

**Býráðið 14. apríl 2011:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um status í málinum um byggiskránna.

**Tekniska nevnd 25. august 2011:** Kim K. Hansen og Eyðbjørn Brimnes, frá Landsbyggifelagnum, kunnaðu um status í málinum um byggiskránna.

**Ískoyti:**
Umsitingin leggur fram byggiskrá, ið hevur verið viðgjørd í bygginevndini.

**Tilmæli:**
Mælt verður til at taka undir við framlagda uppskotinum.

**Tekniska nevnd 22. september 2011:** Kunnað var um málið.

**Ískoyti:**
Umsitingin leggur fram endurskoðaða byggiskrá, ið aftur hevur verið viðgjørd í bygginevndini.

**Tekniska nevnd 18. oktober 2011:** Tikið av skrá.

**Tilmæli:**
Bygginevndin mælir til at taka undir við uppskotinum.

**Tekniska nevnd 8. november 2011:** Kunnað var um málið.

**Umval av býráðslimum í bygginevndina Brúgv um Sandá sambært § 36 í kommunulógini.**

**Býráðið 26. november 2009:** Valdir vórðu Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen.

**Býráðið 14. desember 2011:** Valdir vórðu Levi Mørk og Sjúrður Olsen.

**Ískoyti:**
Nevndin skal taka støðu til útbjóðingina av arbeiðinum at bjóða upp á heildararbeiðstøku . Umsitingin kunnar annars um gongdina í málinum.

**Tilmæli:**
Bygginevndin mælir til at bjóða P/F TG-Verk, P/F Articon og P/F J&K Petersens Contractors til lisitatiónina.

**Tekniska nevnd 19. apríl 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum. Harumframt mælir Jákup Símun Simonsen til at seta sum treyt, at høvuðsráðgeving verður gjørd av føroyskum virki.

**Ískoyti:**
Umsitingin leggur fram endaligt útbjóðingartilfar til støðutakan. Saman við byggiskránni verður framløgd frágreiðing frá ráðgeva um jarðfrøðiligu kanningarnar á økinum, har brúgvin kemur at standa. Eisini verður útbjóðingartilfar til staðsetingina av rundkoyringunum báðum framlagt. Kunnað verður um niðurstøðurnar í bygginevndini.

**Tilmæli:**
Bygginevndin mælir til at góðkenna útbjóðingartilfarið og bjóða arbeiðið út.

**Tekniska nevnd 22. mai 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum, og beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina, fíggjarnevndina og býráðið.

Harumframt mælir Jákup Símun Simonsen til at seta sum treyt, at høvuðsráðgeving verður gjørd av føroyskum virki.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 31. mai 2012:** Nevndin hevur ongar viðmerkingar til útbjóðingartilfarið.

**Fíggjarnevndin 31. mai 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 31. mai 2012:** Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskot frá Jógvani Arge um at seta sum treyt, at høvuðsráðgeving verður gjørd av føroyskum virki.

Fyri atkvøddu: Jógvan Arge.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Sjúrður Olsen, Jan Christiansen, Vagnur Johannesen, Annfinn Brekkstein, Maria Hammer Olsen og Levi Mørk.

Greiddu ikki atkvøðu: Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen og Elin Lindenskov.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Tilfarið í sambandi við útbjóðingina til heildararbeiðstøku var boðið út 3. august 2012. Í hesum tíðarskeiði hevur ávíst samskifti verið millum umsiting og tilboðsgevarar um ymsar tekniskar detaljur í verkætlanini. Eisini hevur samskifti verið við umboð frá Landsverki og Jarðfeingi um jørðkanningar og við umboð frá friðingarmyndugleikanum. Kommunan hevur eftirfylgjandi fingið umbøn frá einum av tilboðsgevarunum um at leingja freistina at lata tilboðið inn, ið er sett til fríggjadagin 12. oktober 2012, kl. 14.00. Biðið verður um at leingja freistina við 2 vikum.

Samskifti hevur verið millum limir í bygginevndini, sum mæla til at ganga umbønini á møti.

Føroya Handverksmeistarafelag hevur eisini sent kommununi skriv, við spurningum og viðmerkingum til útbjóðingartilfarið. Umsitingin hevur gjøgnumgingið skrivið og gjørt uppskot til svarskriv, sum er sent bygginevndini til viðmerkingar.

Greitt verður frá gongdini í málinum.

**Tilmæli:**
Bygginevndin mælir teknisku nevndini til at leingja freistina, soleiðis at lisitatiónin í staðin fyri verður fríggjadagin 26. oktober 2012, kl. 14.00. Bygginevndin mælir eisini til at senda uppskotið hjá umsitingini til svarskriv til Føroya Handverksmeistarafelag.

**Tekniska nevnd 11. oktober 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

Maria Hammer Olsen var ikki við til hetta málið.

**Fíggjarnevndin 12. desember 2012:** Útsett.

**Ískoyti:**
Í samband við gjøgnumgongdina av tilboðunum, hevur bygginevndin útvegað sær hjálp frá uttanhysis serfrøðingum frá COWI, í samband við teknisku avkláringina sambært ABT93, §3, stk 9. Tekniska avkláringin, og eftirfylgjandi spurningar til tilboðsgevararnar vístu, at munandi frávik vóru í tilboðunum í mun til minstukrøvini í byggiskránni, og at talan er í summum førum um frávik sum vilja hava fíggjarligar avleiðingar fyri byggiharran.

Á hesum grundarlagi, er mett um teknisku og løgfrøðiligu viðurskiftini, og er gjørt innanhysis notat um hesi viðurskifti, har niðurstøðan er, at frávikini eru ov stór í mun til minstukrøvini ásett í byggiskránni, og at tey nógvu frávikini og ivamálini viðføra, at ov stórur ivi stendst um samanberingargrundarlagi, til tess at tryggja eina rætta døming av tilboðunum.

Á hesum grundarlagi hevur tekniski stjórin mælt bygginevndini til, at mæla teknisku nevnd, fíggjarnevndini og býráðnum til at annulera lisitatiónina, og bjóða arbeiðið út av nýggjum við hóskandi freist, at nýggj tilboð kunnu dømast og góðkennast av býráðnum áðrenn 31. dec. 2012.

Bygginevndin hevur viðgjørt spurningin og tilmælið frá tekniska stjóranum og komin til ta niðurstøðu at taka undir við tekniska stjórnum og mæla teknisku nevnd at annulera lisitatiónina.

**Tilmæli.**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka undir við bygginevndini.

**Tekniska nevnd 13. desember 2012:** Vísandi til tilmæli frá bygginevndini, grundað á innanhýsis upprit og frágreiðing frá umsitingini um, at ov nógv ivamál eru við innkomnu tilboðunum í mun til minstukrøvini ásett í byggiskránni og útbjóðingartilfarinum annars, samtykti nevndin at taka undir vid bygginevndini, um at mæla byráðnum til at annulera lisitatiónina, og at bjóða arbeiðið út av nýggjum til somu tilboðsgevarar, við freist til fríggjadagin 21. dec. kl. 14.00 at lata inn nýggj tilbod.

Eisini samtykti nevndin, at tilmæli frá dóms-/bygginevndini skal fyriliggja seinast 28. dec. 2012, kl. 12, at leggja fyri nevndina kl. 15.00 sama dag.

Viðv. samsýning fyri tey áður innkomnu tilboðini verður mælt til, at ongin samsyning verður goldin fyri hesi tilboðini, vísandi til at tey ikki lúka minstukrøvini í útbjóðingartreytunum. Samstundis verdur mælt til, at samsyningin fyri nýggj tilboð sum lúka minstukrøvini, verður kr. 250.000, og annars sambært ásetingunum í ABT93, §2, stk. 6.

Samstundis mælir nevndin til, at nakrar broytingar verda gjørdar í útbjóðingargrundarlagnum, herundir hesar:

Vegbanabreiddin á vegum og brúgv um Sandá verdur broytt frá 3,75m til 3,5m
1. Kravið um serstaka vernd millum koyribreyt og gongu-/súkklubreyt verdur strikað
2. Innihaldid í útsendum rættingarskrivum verður innskrivað í útbjóðingartilfarið
3. Tíðarætlanin fyri verkætlanina verður forskotin ein mánaða.

**Fíggjarnevndin 13. desember 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 13. desember 2012:** Einmælt samtykt.

Nevndarlimur hevur biðið um at fáa málið á skrá.

**Tekniska nevnd 27. februar 2013:** Útsett.

**Tekniska nevnd 18. mars 2013:** Kunnað varð um málið.

**<u>Val av býráðslimum til bygginevnd fyri Brúnna um Sandá sambært § 36 í kommunustýrislógini</u>**

**Býráðið 26. november 2009:** Valdir vórðu Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen.

**Býráðið 14. desember 2011:** Valdir vórðu Levi Mørk og Sjúrður Olsen.

**Býráðið 21. mars 2013:** Vald vórðu Marin Katrina Frýdal, Sjúrður Olsen og Sigrún Mohr.

**Ískoyti:**
Til tess at koma víðari við málinum, eftir at upprunaligu tilboðsgevararnir í felag valdu ikki at lata inn tilboð til lisitatiónina 27. des. 2012, má støðast takast til útboðshátt og um hvørt krøvini í byggiskránni skulu broytast, herundir vegabreidd, um longd og hædd á brúgv, um onnur loysn enn brúgv kann gerast o.s.fr.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at ein politisk avgerð verður tikin um yvirskipaðu viðurskiftini um útboðshátt og hvat slag av loysn skal bjóðast út, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 15. mai 2013:** Nevndin samtykti at mæla býráðnum til at halda fast við at eina loysn við brúgv, og at bjóða arbeiðið út í nýggjari heildararbeiðstøku millum somu tilboðsgevarar, við teimum broytingum av byggiskránni, sum samtyktar eru í býráðnum 13. des. 2012.

**Ískoyti**
Í samband við nýggja útbjóðing, er neyðugt at takað støðu til fíggjarlig viðurskifti í samband við samsýningar fyri innkomin tilboð.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og tekniski stjórin mæla til fylgjandi:

- Kr. 250.000 í samsýning til hvønn tilboðsgevara fyri heilt nýggj prosjektir og tilboð, sum ikki byggja á undanfarin uppskot og loysnir,
- Kr. 100.000 í samsýningin til hvønn tilboðsgevara, fyri prosjektir og tilboð, sum byggja á undanfarin uppskot og loysnir,
- Kr. 200.000 í samsýning til hvønn tilboðsgevara, fyri prosjektir og tilboð frá lisitatiínini 26. Okt. 2012, men treytað av, at tilboðsgevarin letur inn eitt ella fleiri nýggj tilboð sambært omanfyristandandi.

Harumframt verður mælt til, at treytirnar í ABT93, §2, stk. 6 eru galdandi fyri vinnandi tilboðið, og at freistin at lata inn nýggj tilboð verður sett til mikudagin 21. aug. 2013.

Somuleiðis verður mælt til, at bygginevndin og umsitingin og bygginevndin hava ein fund við tilboðsgevararnar at fáa greiðu á møguligum ivamálum í útbjóðingartilfarinum

**Fíggjarnevndin 29. Mai 2013:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd hin 15. mai 2013 og við tilmælinum frá kommunustjóranum og tekniska stjóranum og at beina málið í býráðið.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðið 30. mai 2013:** Einmælt samtykt.

**113/13** **2013-1253**

**Umskiping og umbygging av bátahylinum á Argjum**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Gott 300 fólk standa á bíðilista til bátapláss í Tórshavn og á Argjum. Tað er trupult at meta um hvussu nógv av teimum, sum standa á bíðilistanum, høvdu tikið av einum tilboði um bátapláss.
Ymiskir møguleikar at fáa fleiri bátapláss hava verið kannaðir.
Hesar ætlaninar eru lutfalsliga dýrar, tí neyðugt er at byggja nýtt grótkast.

Í sambandi við møguliga bygging av bátahyli á Sundi, blivu 270 spurnarbløð send út umsøkjarar av bátaplássi. Av teimum 270 svaraðu 8o at tey høvdu tikið av, um tað stóð teimum í boði at fáa eitt bátapláss á Sundi..

Møguleikin at umskipa verðandi bátahyl á Argjum eru kannaðir, og ber til at fáa umleið 70 bátaplás afturat. Hetta kann gerast við at burturbeina verðandi fasta mola inni í hylinum, og síðani leggja 170 m av flótibrúgvum í hylin. Hetta ger at vit fáa 100 nýggj pláss við flótibrúgvarnar, meðan talið av teymum verður minkað við 30.

Samlaði kostnaðurin er mettur til tkr. 5.060,-

Arbeiðið er deilt upp í fleiri smærri enterprisur, so sum burturbeining av mola, fundament til brúgvar, el, kavaraarbeiði o.s.v. Hesi arbeiðini verða gjørd av smærri veitarum.

Nógv tann størsti parturin av kostnaðinum er til flótibrúgvar, bummar, landgongdir, ketur o.a. Fólk hjá Tórshavnar havn hava royndir at standa fyri, og at gera hesi arbeiðir.

Ætlanin skal fíggjast av íløgukonto 7476 smábátahavnir.

Kontan er í dag disponerað soleiðis:

| | |
|---|---|
| Íløgukarmur | 750.000 |
| Brimgarður á Argjum | 670.000 |
| Útbúnaður á bátaøkinum | 3.642.742 |
| Bátapláss Gomlurætt | 24.000 |
| Bátahylur á Sundi | 1.000.000 |
| | 6.086.742 |

**Tilmæli frá havnarmeistaranum:** Mælt verður til at játta t.kr 5.060,- til endaliga liðugtgerð av arbeiðinum, at fíggja av íløgukonto nr. 7476 smábátahavnir, soleiðis at kontan verður disponera soleiðis:

| | |
|---|---|
| Umskiping/umbygging av bátahylinum á Argjum: | 5.060.000 |
| Útbúnaður á bátaøkinum: | 1.026.742 |
| | 6.086.742 |

**Vinnunevndin 21. mai 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 29. mai 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við vinnunevndini.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðið 30. mai 2013:** Einmælt samtykt.

**114/13** **2013-1150**

**Viðv.: Góðkenning av broytingum í viðtøkum fyri Eigarafelagið Berjabrekka 1**

**Málslýsing - samandráttur**
Eigarafelagið biður um góðkenning av broytingum í viðtøkum fyri Eigarafelagið á Berjabrekku.

**Tilmæli:**
Leiðarin á løgdeildini og kommunustjórin mæla fíggjarnevndini og býráðnum til at góðkenna broytingar í viðtøkunum fyri Eigarafelagið á Berjabrekku.

**Fíggjarnevndin 29. mai 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðið 30. mai 2013:** Einmælt samtykt.

**115/13** **2013-1063 KF**

**Uppskot til broyting av almennu byggisamtyktini fyri matr. nr. 804a við Dalavegin í Tórshavn**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Felagið Bústaðir, fyrrverandi Húsalánsgrunnurin, hevur ætlanir um at byggja leiguíbúðir ymsastaðni í landinum, harímillum á matr. nr. 804a við Dalavegin í Tórshavn.

Í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, er hetta økið lagt út sum A1-øki til sethús. Tí er ikki møguligt at byggja íbúðir her í verandi støðu.

Í Tórshavn eru í dag alt ov fáar leiguíbúðir og tí er tað av stórum týdningi at forðingar ikki verða settar fyri at ætlanum um bygging av leiguíbúðum í býnum.

Býarskipanardeildin mælir til at byggisamtyktin fyri matr. nr. 804a við Dalavegin í Tórshavn, verður broytt frá A1-øki til A3-øki, soleiðis at íbúðir kunnu byggjast á økinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at almenna byggisamtyktin verður broytt soleiðis, at ognirnar matr. nr. 804a við Dalavegin í Tórshavn, verður broytt frá A1-øki til A3-øki.

**Tekniska nevnd 15. mai 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 30. mai 2013:** Einmælt samtykt.

**116/13** **2013-1062 KF**

**Uppskot til broyting av almennu byggisamtyktini fyri matr. nr. 897e, 897k og 897h, oman Mattalág**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Felagið Bústaðir, fyrrverandi Húsalánsgrunnurin, hevur ætlanir um at byggja leiguíbúðir ymsastaðni í landinum, harímillum á matr. nr. 897e, 897k og 897h, oman Mattalág í Tórshavn.

Í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, er hetta økið lagt út sum A1-øki til sethús. Tí er ikki møguligt at byggja íbúðir her í verandi støðu.

Í Tórshavn eru í dag alt ov fáar leiguíbúðir og tí er tað av stórum týdningi, at forðingar ikki verða settar fyri at ætlanum um bygging av leiguíbúðum í býnum.

Býarskipanardeildin mælir til at byggisamtyktin fyri matr. nr. 897e, 897k og 897h, oman Mattalág, verður broytt frá A1-øki til A3-øki, soleiðis at íbúðir kunnu byggjast á økinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at almenna byggisamtyktin verður broytt soleiðis, at ognirnar matr. nr. 897e, 897k og 897h, oman Mattalág, Tórshavn, verður broytt frá A1-øki til A3-øki.

**Tekniska nevnd 15. mai 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 30. mai 2013:** Einmælt samtykt.

117/13 **2012-2383/9 SG (sí eisini j.nr. 2012-0028) HH**

**Matr. nr. 1406a, Tórshavn. Tinglýstur eigari: Kartni Winther**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Trøðin er til víddar 15.859 harav veglutur 317 m². (Tinglýst ognarveðbræv til Eik Banka kr. 1,5 mill. kr.)

Árni og Mads A. Winther bjóða kommununi helmingin av trøðni til keyps fyri 1,2 mill. kr. (svarandi til kr. 151,33 m²).

Teir umhugsa eisini møguleikan at selja trøðna, antin í fríðari sølu ella til Tórshavnar kommunu fyri metingarvirði 2,4 mill. kr.

Árni Winther, ynskir tó heldur at selja eystara helmingin av trøðni, sum er móti ánni til kommununa, soleiðis at hann kann hava hin helmingin eftir.

Kommunan kann fáa tinglýstan forkeypsrætt í partinum hjá Árna Winther.

Alfred Petersen, advokatur, hevur 5. juli 2012 virðismett trøðna til 2,4 mill. kr. svarandi til 151,33 kr. m².

Sambært Búnaðarstovuni er fermeturprísurin fyri velt lendi og væl dyrkingarbært lendi, sum liggur væl fyri í Tórshavn 143,60 kr. m²(íroknað endurgjald fyri mist bit og endurgjald fyri mista fóðurframleiðslu).

Kommunan arbeiðir saman við landinum, um at skapa eitt stórt samanhangandi náttúruøki líka frá Boðanesgjógv og niðan í Villingardal. Matr. nr. 1406a, liggur inni á hesum øki.

**Tilmæli:**
Leiðarin á starvs- og løgdeildini og miðfyrisitingarstjórin mæla til at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Fíggjarnevndin 24. oktober 2012:** Samtykt at beina málið í byggi- og býarskpanarnevndina.

**Ískoyti:**

Lendisdeildin og býarskipanardeildin viðmæla, at kommunan ognar sær lendið, eystara helmingin av trøðni, sum er móti ánni, sum er ein tíðandi partur av samlaða frílendisøkinum.

Víst verður eisini til fundarfrásøgn frá 1. oktober 2012 í Ráðhúsinum j.nr. 2012-2383/2.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggideildini mæla til at keypa tann niðara partin móti ánni, sum er umleið 4.600 fermetrar til støddar og at eitt møguligt keyp er treytað av at kommunan fær loyvi til at leggja kloakk i vestara part av trøðni (samb. mál nr. 2012-0028), og beina málið aftur í fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 27. februar 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið aftur í fíggjarnevndina.

Helena Dam á Neystabø og Bogi Andreasen vóru ikki við til hetta málið

**Fíggjarnevndin 13. mars 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 21. mars 2013:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Eigararnir hava boðað frá, at teir eru ikki sinnaðir til einans at selja uml. 29% av trøðni, og halda fast við at talan einans kann gerast um at selja umleið helmingin av trøðni.

Teir nevna, at kommunan kann áseta linjuna, í samband við uppbýti av trøðni, men er neyðugt at tryggja verður atkoma til tann partin av trøðni, sum teir hava eftir.

Tað skal viðmerkjast at úthúsini, sum standa niðan móti vegnum, ætlandi koma at liggja inni á partinum, sum kommunan ætlandi keypir.

Um so er, ynskja teir at hava møguleika til at kunna byggja onnur líknandi úthús á øðrum stað á trøðni, og nevna teir her møguleikan fyri at kunna binda í kloakkleiðingina, sum kommunan ætlandi leggur inni á økinum.

Sí teirra uppskot um sundurbýti. Kortskjal 2012-2383/12

**Tilmæli.**
Leiðarin á løgdeildini og kommunustjórin mæla at keypa helmingin av trøðni fyri kr. 1.200.000,00.

Tann partur av málinum, sum viðvíkir hvar trøðin skal býtast sundur, atkoma til trøðna, niðurtøka av verandi húsum, og loyvi til at byggja nýggj líknandi hús, við møguleika til íbinding í kloakk v.m., verður beind aftur í teknisku nevnd.

Víst verður til fundarfrásøgn frá 1. oktober 2012 í ráðhúsinum j. nr. 2012-2383/2 og til fundarfrásøgn 2012-2383/10 og teirra uppskot til sundurbýti. Kortskjal 2012-2383/12.

**Fíggjarnevndin 29. mai 2013:** Samtykt at beina málið aftur í teknisku nevnd samsvarandi tilmælinum.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðið 30. mai 2013:** Tikið av skrá.

**118/13** **2012-2512**

**Uppskot um gøtunavn til útstykking matr. 1458a við Sundsvegin**

Sámal Jákup Joensen, sum er farin undir útstykking við Sundsvegin, hevur sent gøtunavnanevndini skriv við uppskoti til gøtunavn til útstykkingina. Skrivið kom 23. oktober 2012 og varð býtt út á fundinum.

**Gøtunavnanevndin 25. oktober 2012:** Málið varð umrøtt. Tað verður viðgjørt aftur á næsta fundi, tá nevndin hevur útvegað sær meira tilfar um staðarnøvn og gøtunøvn við Sundsvegin.

**Gøtunavnanevndin 18. desember 2012:** Nøkur uppskot vórðu umrødd, men eingin niðurstøða varð gjørd, tí einki navn var í uppskoti, sum semja fekst um. Miðað verður eftir, at nevndin á næsta fundi finnur eitt navn, sum hóskar til gøtunøvn og staðarnøvn har á leið.

**Gøtunavnanevndin 22. apríl 2013:** Upprunaliga uppskotið frá eigaranum var *Ternuteigur*, og hetta varð viðgjørt aftur á fundinum. Nevndin tók ikki undir við at nýta *-teigur*, tí ein teigur er eitt mjátt stykki millum veitir, so tað er heldur lítið øki til eina útstykking. Nevndin mælti heldur til *-lág*, tí tað hóskar betur til lendið.

Gøtunavnanevndin mælir til, at gøtunavnið á útstykkingini verður *Ternulág*.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við gøtunavnanevndini.

**Mentamálanevndin 15. mai 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðið 30. mai 2013:** Einmælt samtykt.

**119/13** **2001-0407 – BH**

**Landsvegaføring frá Hjalla til Krákugjógv**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Ivi hevur tikið seg upp, um tað er rætt at fremja tað ætlaða 1. byggistigið av atkomvegnum til Havnar (Ytra ringvegi), úr Krákugjógv undir Húsareyni norður í Sundsvegin, í tí líki, ætlanin fyriliggur.

Fleiri orsøkir eru til ivan. Nógv er broytt á samferðsluøkinum, síðani hesin vegur var stungin út fyri 20 árum síðani. Fast samband er fingið í lag í Vágar, fyrsta dagin verður koyrandi undir Leirvíksfjørð, og um fá ár verður tunnil millum Skálafjørðin og Suðurstreym ætlandi veruleiki. Aftrat hesum eiga vit at rokna við føstum sambandi í Sandoynna.

Sostatt er í dag talan um ógvuliga nógv broyttar fortreytir í mun til støðuna fyri 20 árum síðani, og við framtíðini í huga má hædd takast fyri hesum.

Stórir vansar eru við ætlaða vegateininum, sum fer at elva til langar bíðirøðir út í frammanundan nógv trafikerað øki.

Vegurin fer gjøgnum bygt øki, sum vit í dag ikki eiga at góðtaka eins væl og fyri 20 árum síðani.

Nógv ognartøka skal til eftir øllum teininum. Vegurin liggur í einum skráa við vanda fyri grót- og áarlopi. Nógvur kavi legst á teininum og krevur nógva rudding.

Fyri umhvørvið sum heild fer hetta inntriv at hava ógvuslig árin.

Tí eigur 1. byggistig av atkomuvegnum til Havnar (Ytri ringvegur) at verða lagt øðrvísi. Besta loysn er at leggja vegin í tunnil. Hendan loysnin leggur so at siga einki øki undir seg og fer at lætta um á kommunala **veganetinum.**

**Býráðið 15. desember 2005:** Uppskot frá býráðsmeirilutanum: Til tess at gera greitt, hvat Tórshavnar býráð heldur um vegaføringina í 1. byggistigi av atkomuvegnum til Havnar (Ytra Ringveg) samtykkir býráðið at siga frá, at hon eigur ikki at vera, sum hon er stungin út, men framd við tunli ella vegaføring upp um Húsareyn.

Samtyktin verður beind í teknisku nevnd til viðgerðar at leggja aftur fyri býráðið.

Atkvøtt varð um uppskotið, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og 3 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Kári Árting, Katrin Dahl Jakobsen og Elin Lindenskov

Ímóti atkvøddu: Inga Dahl, Bjarti Mohr og Beate L. Samuelsen.

**Ískoyti:**
Farið verður á ástaðarfund undir Krákugjógv.

**Tekniska nevnd 9. mars 2006:** Eftir at hava verið á staðnum samtykti nevndin at mæla býráðnum til at halda fast við, at vegaføringin í 1. byggistigi av atkomuvegnum til Havnar (Ytra Ringvegi) verður framd við tunnli úr Krákugjógv undir Húsareyni norður í nýggja atkomuvegin við Sundsvegin.

**Ískoyti:**
Í sambandi við arbeiðið at leggja atkomuveg til Havnar, er Landsverk sum kunnugt farin undir fyrra part av anleggsarbeiðinum, sum er strekkið frá økinum norðan fyri útstykkingina millum Gilja og suður í móti økinum við Oyggjarvegin - undir Krákugjógv.

Sambært Landsverki er ætlanin, at hetta strekkið skal verða liðugt í 2008, og at strekkið frá Skarðshjalla og suður ímóti verandi atkomuvegi skal vera liðugt í 2012.

Landsverk ætlar nú at fara undir vegarbeiðið á strekkinum frá brúnni um Hoydalsá og suður í móti økinum undir Krákugjógv.

Í sambandi við viðgerðina av øllum projektinum um atkomuvegin hjá landsverki, eru ítøkilig viðurskifti, sum kommunan eigur at taka støðu til. Hesi viðurskifti eru:

1. Íbinding við Eysturoyartunnilin
2. Planskyld íbinding við ídnaðarøki og Stórutjørn
3. Flytan av atkomuvegnum við Stórutjørn
4. Liðugtgerð av planskyldari íbinding norðan fyri útstykkingina Millum Gilja so at atkomuligt er til Flatarvegin

5. Brúgvaskap á vegamótinum millum landsvegin og Flatarvegin. Skal avtala fáast í lag við Landsverk um fyribils at binda í atkomuveg – ella skal farast undir at gera brúgv, áðrenn ferðsla verður á strekkinum.
6. Umlegging av Sundsvegnum
7. Støðutakan til tunnilsloysn við Villingardalsvegin
8. Støðutakan til íbindingina undir Krákugjógv
9. Støðutakan til íbinding við Hotel Føroyar
10. Støðutakan til atkomuveg til Velbastaðvegin
11. Støðutakan til verandi íbinding við Oyggjarvegin
12. Veitingar á landsvegi
13. Frástøða - byggilinja

Víst verður til fund, j.nr. 2003-1884/12, millum umboð fyri Tórshavnar kommunu og Sp/f HMP-Consult, sum er ráðgevi hjá Landsverki í hesum máli.

Kunnað verður um málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 27. november 2006:** Kunnað var um málið.

**Tekniska nevnd 30. november 2006:** Kunnað var um málið.

**Ískoyti:**
Vinnumálaráðið sigur í skrivi, dagfest 5. september 2006, at hóast tað framvegis er metingin, at verandi vegaætlan við Villingardalsveg er ein fullgóð loysn, er ráðið sinnað at ganga ynskinum hjá býráðnum um tunnil á møti, um býráðið góðtekur at gjalda kostnaðarmunin millum ætlaðu vegaloysnina og tunnilsloysnina, sum er í uppskoti, og hartil meirkostnaðin av rakstrinum í eitt áramál.

Sambært einari leysliga meting er kostnaðarmunurin millum ætlaðu vegaloysnina og tunnilsloysnina einar 30 mió. kr. umframt meirkostnað í rakstri.

Treytirnar fyri einari slíkari avtalu eru, at umrøddi teinur verður landsvegur, at kommunan tekur meirkostnaðin fyri tunnilsloysnina uppá seg, og at Landsverk kann góðtaka loysnina vegatekniskt.

Býráðið eigur eisini at hava í huga, at ferðslan eftir hesum vegastrekki sambært framrokningum fer at økjast tey næstu 15-20 árini í so stóran mun, at tað helst verður neyðugt at gera eitt tunnilsrør afturat og kannast má tí, um tað av teknisku ávum er neyðugt at spreingja tunnil nr. 2 samstundis sum tunnil nr. 1, og um so er, má kommunan eisini gjalda meirkostnaðin av hesum.

Tekniska umsitingin vísir á, at við tí vegalinju, sum nú er kend, eru tað ikki ferðslutekniskar orsøkir til at gera tunnilin undir Krákugjógv.

Tekniska umsitingin staðfestir eisini, at tað eru ikki annarleiðis umhvørivslig atlit at taka á økinum við Krákugjógv enn aðrastaðni fram við ytra ringvegnum, tá talan er um frástøða frá bygdum øki, náttúruviðurskifti o.l.

Tekniska umsitingin metir tí, at nyttuvirknaðurin av einum tunnli undir Kráku-gjógv ikki svarar til ein meirkostnað á kr. 20-30 mió. í kommununnar part, sam-svarandi skrivi frá Føroya landsstýri og eini leysligari kostnaðarmeting.

Í sambandi við fíggjarliga partin skal eisini vísast á, at ein tunnil vil gerast dýrari í rakstri enn við at hava ein vanligan veg út frá teimum fortreytum, sum landsvega-myndugleikin rekur landsveganetið uppá.

**Tilmæli:**
Vísandi til omanfyristandandi mæla kommunustjórin og tekniski stjórin frá at gera tunnil undir Krákugjógv.

**Fíggjarnevndin 6. desember 2006:** Ein meiriluti, Jan Christiansen, Høgni Mikkelsen og Leivur Hansen, mælir býráðnum til at taka undir við tilmælinum hjá kommunustjóranum og tekniska stjóranum.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Hildur Eyðunsdóttir, taka støðu á býráðsfundi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 11. desember 2006:** Málið tikið av skrá.

**Nýtt:**
Ráðgevandi fyritøkan P/F HMP Consult hevur fyri Landsverk gjørt nýtt uppskot til nýggja landsvegaføring til og uttan um Tórshavn. Onnur uppskot hava verið gjørd áður.

Í løtuni eru 3 landsvegainnføringar til Tórshavn. Hesar eru eftir Kaldbaksvegnum, eftir gamla Oyggjarvegnum og eftir vegnum í Havnardali frá Gomlurætt. Nýggi landsvegurin norðan fyri høvuðsstaðin kemur at binda saman allar hesar 3 landsvegainnføringarnar til Tórshavn. Nýggi landsvegurin byrjar úr verandi Kaldbaksvegnum beint eystan fyri Skarðshjalla, og fer so gjøgnum Hoyvíkshagan yvir til Villingadal og fram við Húsareyni, har hann verður bundin í verandi Oyggjarvegin. Haðani er vegurin ætlaður at fara gjøgnum Flatnahagan út í Havnardal, har hann verður bundin í verandi landsvegin til Gomlurætt.

Um tunnil millum Skálafjørðin og Havnina gerst veruleiki, kemur hesin at blíva íbundin Kaldbaksvegin ella omanfyri nevnda nýggja landsvegastrekkið.

Landsveganetið í Føroyum bindir saman bygdir og býir, uttan mun til støðd. Í Tórshavn eru fleiri einstakir býlingar, sum einsamallir eru nógv størri enn fleiri bygdir. Framskrivingar av býarmenningini vísa m.a., at serliga uppi í Hoyvíkshaganum, í Vesturbýnum og á Argjum fer munandi vøkstur at verða í bæði fólkatali og tali av bústaðareindum.

Tekniska umsitingin metir tað vera sera umráðandi, at av- og ákoyringar til nýggja landsvegin verða skipaðar í tøttum samstarvi við Tórshavnar kommunu. Tryggjast má ein góð fordeiling av ferðsluni, og at bæði verandi og komandi kommunala veganetið er ført fyri at lofta ferðsluni og fordeila ferðsluna á rættan hátt, fyri ikki at fáa ferðsluruðuleika inni í býnum. Tí er eisini umráðandi at tal, støðd og staðseting av íbindingum í landsvegin taka støði í støðd av býlingunum (fólkatal og bústaðareindir), tí sum longu nevnt eru fleiri býlingar sum eru nógv størri enn heilar bygdir.

Í sambandi við viðgerðina av øllum prosjektinum um atkomuveg hjá Landsverk, hevur umsitingin á eini verkstovu 5. desember 2006 viðgjørt niðanfyri standandi viðurskifti.

1. Vegakategori og framtíðar tillagingar av vegastrekkinum
2. Íbinding við Eysturoyartunnilin
3. Íbinding við vinnuøkini Sandvíkarhjalli, Skarðshjalli og Ovari Hjalli
4. Planskyld íbinding við Stórutjørn
5. Flytan av atkomuvegnum við Stórutjørn
6. Íbinding við Flatarvegin
7. Umlegging av Sundsvegnum
8. Íbinding við Villingadalsvegin
9. Støðutakan til tunnilsloysn við Villingadalsvegin
10. Íbinding í verandi veganet undir Krákugjógv
11. Oyggjarvegurin frá Hotel Føroyar til Norðara ringvegin
12. Íbindingar á økinum við Hotel Føroyar
13. Vegaføring og íbinding í Velbastaðvegin
14. Støðutakan til verandi íbindingar við Oyggjarvegin
15. Støðutakan til veitingar til el, vatn, kloakk, fjarhita og reinskan av vegvatni.
16. Støðutakan til gonguteigar og súkklubreytir.
17. Støðutakan til byggilinju (frástøðu) frá landsvegnum

**Tilmæli:**
Við støði í viðgerðini á verkstovuni mæla tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin til:

1. **Vegakategori og framtíðar tillagingar av vegastrekkinum**
   Grundað á ferðsluframskrivingar verður mælt til at taka undir við, at vegurin verður fyrireikaður til ein 4-sporaðan veg til ferðslu við 80 km/t, og at vegurin horisontalt- og vertikalt verður tilevnaður hesum fyritreytum.
   Mælt verður tó samstundis til, at á vegastekkinum frá planskyldu íbindingini við Stórutjørn til ætlaðu nýggju íbindingina vestan fyri Hotel Føroyar, verður ferðin avmarkað til 50 km/t, og at íbindingarnar millum kommunala veganetið og landsvegin verða gjørdar sum stórar rundkoyringar. Hetta er ikki minst neyðugt fyri at fleiri stórir komandi býlingar, sum koma at liggja uttan fyri landsvegin, fáa samband við hendan. Tá ársmiðalferðslan í framtíðini fer upp um 20.000 bilar um samdøgri, kann ferðin hækkast til 80 km/t, samstundis

sum íbindingarnar kunnu endurskoðast, og støða takast til um vegurin skal gerast 4-sporaður.

2. **Íbinding við Eysturoyartunnilin**
   Onki ítøkiligt fyriliggur enn uppá hvar linjuføringin fyri ætlaða tunnilin millum Skálafjørðin og Havnina verður, og tískil heldur ikki uppá hvar tunnilin eftir ætlan kemur upp og hvar íbinding verður í landsvegin. Mælt verður til, at Tórshavnar kommuna, sum planleggingarmyndugleiki í kommununi, setir fram krav um at verða við til at taka avgerð um, hvar og hvussu tunnilin kemur upp.

3. **Íbinding við vinnuøkini Sandvíkarhjalli, Skarðshjalli og Ovari Hjalli**
   Í løtuni fyriliggur ikki eitt nóg neyvt grundarlag at taka støðu til, bæði um, hvar ella hvussu kommunala veganetið við verandi vinnuøkir á Sandvíkarhjalla og Skarðshjalla, og eitt komandi vinnuøki á Ovara Hjalla, skulu bindast í landsveganetið. Mælt verður tí til, at hetta verður kannað nærri í sambandi við útstykkingar- og byggiætlaninar í økjunum, og at lendi til eina møguliga íbinding við rundkoyring við Ovara Hjalla verður hildi tøkt, til greiða er fingin á hesum. Tí verður mælt til, at vegasamband til Ovara Hjalla verður gjørt við eini rundkoyring frá Hvítanesvegnum.

4. **Planskyld íbinding við Stórutjørn**
   Mælt verður til, at gjørd verður planskyld íbinding við Stórutjørn. Hetta verður fyrsta stóra íbindingin millum kommunala- og landsveganetið á strekkinum, og eigur henda íbinding tí at rindast av Landsverk.
   Mælt verður til, at vegastrekkið frá íbindingini í Kaldbaksvegin til planskyldu íbindingina við Stórutjørn, beinanvegin verður gjørt sum 4-sporaður vegur við mest loyvdu ferð á 80 km/t. Vísandi til omanfyri standandi pkt. 1 verður eisini mælt til, at á vegastrekkinum frá planskyldu íbindingini við Stórutjørn til ætlaðu nýggju íbindingina vestan fyri Hotel Føroyar, verður mest loyvda ferðin sett til 50 km/t.

5. **Flytan av atkomuvegnum við Stórutjørn**
   Ynski er sett fram um at fáa landsvegalinjuna flutta 50 m longur norður – tvs. burtur frá Stórutjørn. P/F HMP Consult hevur kannað møguleikan fyri hesum, og onki er til hindurs fyri tí. Men ein slík flyting av vegalinjuni vil viðføra, at ein partur av vegastrekkinum, sum longu er gjørt, má umleggjast. Kostnaðurin fyri hetta arbeiði er av Landsverk mettur til kr. 2,0 mió. Mett verður, at Landsverk undir øllum umstøðum eigur at flyta vegin uml. 25 m longur norður júst við Stórutjørn, fyri at tilpassa vegin betur til lendisviðurskiftini á staðnum – tvs. av umhvørvisávum. Við verandi linjuføring kemur vegurin nærum í sjálva tjørnina, og kemur harumframt beint inn í ein høgan kneysa í lendinum. Mælt verður tí til, at Landsverk skal flyta vegaføringina minst 25 m longur burtur frá Stórutjørn, fyri at fáa vegin at fella betur í lendi og fyri ikki at koma so nær tjørnini.

6. **Íbinding við Flatarvegin**
   Tað verður mett serstakliga umráðandi, at tað á vegastrekkinum frá Stórutjørn til Oyggjavegin verða tikin atlit til verandi kommunala veganet, og hvussu ferðslan av landsvegnum verður fordeild eftir verandi vegum inn til Vegin Langa og haðani víðari til Norðara ringvegin. Flatarvegurin er ein av hesum vegum.
   Fram til 2012, tá hesin parturin av landsvegnum eftir ætlan verður liðugur, verður mælt til at Flatarvegur, Sundsvegur og Villingadalsvegur verða bundnir í landsvegin, og at teir partar av vegnum, sum eru lidnir, sostatt verða nýttir beinanvegin.
   Fyri tíðarskeiðið aftan á 2012 verður mælt til, at minst 2 av teimum 3 verandi vegunum á staðnum – t.e. Flatarvegurin, Sundsvegurin og Villingadalsvegurin, verða íbundnir landsvegin við rundkoyring, sum er minst 32 m í diametur. Nóg stórt økið skal tó leggjast av, soleiðis at tað uppá sikt er møguligt at gera planskylda íbinding har um leiðir, um ársmiðalferðslan fer upp um 20.000 og avgjørt verður at hækka mest loyvdu ferðina á strekkinum til 80 km/t (sí pkt. 1.)

7. **Umlegging av Sundsvegnum**
   Brúgv er gjørd tvørtur um Hoydalsá. Her er sostatt eisini møguligt at føra Sundsvegin undir landsvegin. Við at binda Sundsvegin í landsvegin, fæst beinleiðis vegasamband inn til bæði Vegin Langa og til Norðara ringvegin. Víst verður annars til tilmæli til omanfyri standandi pkt. 6.

8. **Íbinding við Villingadalsvegin**
   Villingadalsvegurin er lutfalsliga smalur, og trupult er at breiðka hann, orsakað av nógvari bygging á báðum síðum av vegnum. Harumframt er ikki pláss til at gera íbinding í Norðara ringvegin við rundkoyring, uttan at taka burtur verandi hús. Víst verður annars til tilmæli til omanfyri standandi pkt. 6.

9. **Støðutakan til tunnilsloysn við Villingadalsvegin**
   Tekniska umsitingin vísir á, at við tí vegalinju, sum nú er kend, eru tað ikki ferðslutekniskar orsøkir til at gera tunnil við Villingadalsvegin. Tekniska umsitingin staðfestir eisini, at tað eru ikki annarleiðis umhvørvislig atlit at taka á økinum við Krákugjógv enn aðrastaðni fram við landsvegnum, tá talan er um frástøðu frá bygdum øki, náttúruviðurskifti o.l. Tekniska umsitingin metir tí, at nyttuvirknaðurin av einum tunnli við Villingadalsvegin ikki svarar til ein meirkostnað á kr. 20-30 mió. í kommununar part, samsvarandi skrivi frá Føroya Landsstýri og eini leysligari kostnaðarmeting. Mælt verður tí frá at gera tunnil við Villingadalsvegin.

10. **Íbinding í verandi veganet undir Krákugjógv**
    Loysnin í uppskotinum hjá Landsverk er ein planskyld íbinding við landsvegin, sum førir til eina rundkoyring á Norðara ringvegnum. Henda loysn tykist heldur kroyst og trupul á staðnum, og tekniska umsitingin ivast tí í, um hetta fer at virka nóg væl til at koyrandi fara at brúka hesa íbinding í so stóran

mun, at tað fer at viðvirka til eina góða fordeiling av ferðsluni til og frá Norðara ringvegi. Tekniska umsitingin sær eisini hesa íbinding sum ein part av eini loysn viðv. Landsvegaføringini frá verandi íbinding millum Oyggjarvegin og Norðara ringveg niðan til Hotel Føroyar. (Sí pkt. 11)
Mælt verður tí til, at hildi verður fast um upprunaligu loysninga sum er, at gera eina íbinding við rundkoyring og so binda frákoyringina frá rundkoyringini í verandi vegin oman fyri P/F Wenzel Petersen.

**11. Oyggjarvegurin frá Hotel Føroyar til Norðara ringvegin**
Landsvegurin er ætlaður at blíva bundin í verandi Oyggjarveg nakað vestan fyri P/F Wenzel Petersen. Oman fyri Hotel Føroyar fer landsvegurin síðani oman av verandi Oyggjarvegi. Henda vegaføring lýkur ikki tær ferðsluteknisku fyritreytirnar fyri einum 80 km vegi við nógvari ferðslu, sum Landsverk annars hevur lagt til grund fyri hesum nýggja landsvegnum sum heild.
Mælt verður tí til, at á strekkinum frá har Landsverk hevur ætlanir um at gera eina planskylda íbinding undir Krákugjógv, til á leið har sum ætlanir eru um planskylda íbinding vestan fyri Hotel Føroyar, skal Landsverk gera 4-sporaðan tunnil í seinasta lagi tá ársmiðalferðslan fer upp um 20.000 bilar.

**12. Íbindingar á økinum við Hotel Føroyar**
Tórshavnar kommuna tekur undir við, at økið vestan fyri Norðbil kann leggjast út til byggilendi, við serstøkum atkomuvegi, soleiðis sum prosjekterað av ráðgevunum hjá Landsverk. Tó er onki sum talar fyri at ferðslan til hetta økið gerst so stór, at neyðugt er við rundkoyring á verandi Oyggjarvegin. Tá talan er um íbinding oman móti býnum, verður mælt til at gera hesa við eini stórari rundkoyring heldur enn eini planskyldari íbinding. Nóg stórt øki skal tó leggjast av, soleiðis at tað uppá sikt er møguligt at gera planskylda íbinding har um leiðir, um ársmiðalferðslan fer upp um 20.000 bilar og avgjørt verður at hækka mest loyvdu ferðina á strekkinum til 80 km/t (sí pkt. 1.)

**13. Vegaføring og íbinding í Velbastaðvegin**
Tann av P/F HMP Consult teknaða loysnin við íbinding av landsvegnum í verandi landsveg úti í Havnardali, er ikki í samsvar við tað sum áður er teknað. Vegatekniskt er seinasta uppskotið nøktandi, men neyðugt er at fáa betur lýst hvat vegaføringin og íbindingarnar merkja fyri verandi bygging í økinum og fyri verandi vegir í økinum (Velbastaðvegur og vegin út í Havnardal).

**14. Støðutakan til verandi íbindingar við Oyggjarvegin**
Norðbil, Brandstøðin og P/F Wenzel Petersen hava sum er íbinding í Oyggjarvegin, umframt at einstøk sethús á økinum eisini eru íbundin Oyggjarvegin.
Mælt verður til, at um Landsverk ætlar at niðurleggja verandi íbindingar, mugu teir útvega aðrar í staðin. Harumframt verður mælt til takað undir við, at økið vestan fyri Norðbil kann leggjast út til byggilendi, við serstøkum atkomuvegi, soleiðis sum prosjekterað av ráðgevunum hjá Landsverk. Tó er

onki sum talar fyri, at ferðslan til hetta økið gerst so stór, at neyðugt er við rundkoyring á verandi Oyggjarvegin.

15. **Støðutakan til veitingar til el, vatn, kloakk og fjarhita**
    Sambært upplýsingum sum tekniska umsitingin hevur fingið, hevur Landsverk ikki ætlanir um at gera fyrireikingar til at leggja leiðingar til el, vatn, kloakk og fjarhita í landsvegin.
    Tekniska umsitingin metir, at tað er óhugsandi at hava ein høvuðsveg sum fer gjøgnum bygt økið, og sum er myrkur, sum ikki loftar yvirflatuvatnið og ikki tekur hædd fyri brandpostum o.l.
    Mælt verður tí til at krav verður sett fram um, at tílíkar leiðingar skulu leggjast í vegin, eins og gjørt verður aðrastaðni har landsvegir fara gjøgnum bygt økið. Harumframt er ynskiligt, at fyrireikingar verða gjørdar til at fjarhitaleiðingar kunnu leggjast í vegkantin.
    Víst verður annars á býráðssamtykt um reinskan av vegvatni j. nr. 2005-1437.

16. **Støðutakan til gonguteigar og súkklubreytir**
    Mælt verður til, at ein tílíkur vegur gjøgnum bygt økið hevur gonguteigar og súkklubreytir, soleiðis at sleppast kann undan at gangandi og súkklandi – m.a. útlendsk ferðafólk – ganga og súkkla á koyribreytunum millum bygdir, soleiðis sum tey gera flestu staðni sum nú er. Stórt tal av ferðandi koma hvørt ár til Havnar og fara herfrá víðari kring landið.
    Víst verður annars á býráðssamtykt um gonguteigar og súkklubreytir j. nr. 2005-1436.

17. **Støðutakan til byggilinju (frástøðu) frá landsvegnum**
    Av tí at talan er um ein landsveg, sum fer ígjøgnum partvíst bygt økið, og økið sum í byggisamtyktini fyri Tórshavn er lagt av til byggilendi, metir tekniska umsitingin, at tað er ikki grundarlag fyri at áseta størri fjarstøðu enn 25 m frá vegmiðju til byggiljuna fram við landsvegnum. Tó verður mælt til, at tað í sambandi við byggilinjuna verður tikin hædd fyri teimum støðum, har íbindingar væntast at koma í framtíðini, sum antin rundkoyringar ella planskyldar íbindingar.

**Tekniska nevnd 13. desember 2006:** Málið tikið av skrá.

**Býráðið 14. desember 2006:** Tikið av skrá.

**Nýtt:**
Landsverk hevur hin 31. januar 2007 havt framløgu fyri byggi- og býarskipanarnevndini, teknisku nevnd og heilsu- og umhvørvisnevndini av vegaprojektinum um nýggjan landsveg frá Kaldbaksvegnum til Havnardal. Sama dag, gjøgnumgingu omanfyri nevndu faknevndir einkultu partarnar av málinum, og var hetta framhald av tí nevndarviðgerð, sum frammanundan hevur verið í byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd.

Tilmæli hjá tekniska stjóranum, býarverkfrøðinginum og býararkitektinum fyri einstøku punktini er eftir henda fundin tillagað soleiðis:

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til:

1. **Vegakategori og framtíðar tillagingar av vegastrekkinum**
   Grundað á ferðsluframskrivingar verður mælt til at taka undir við, at vegurin verður fyrireikaður til ein 4-sporaðan veg til ferðslu við 80 km/t, og at **allur** vegurin horisontalt- og vertikalt verður tilevnaður út frá hesum fyritreytum.
   Mælt verður tó samstundis til:
   a) **at** á vegastekkinum frá planskyldu íbindingini við Stórutjørn til ætlaðu nýggju íbindingina vestan fyri Hotel Føroyar verður ferðin avmarkað til 50-60 km/t
   b) **at** íbindingarnar millum kommunala veganetið og landsvegin verða gjørdar sum vanligar T-kross íbindingar, so leingi ársmiðalferðslan ikki ger tað neyðugt at gera annað slag av íbindingum.
   c) **at** biðja Landsverk um ferðslutekniskar kanningar av hvat er hóskandi sum mest loyvda ferð á strekkinum, har vanligar T-íbindingar og/ella rundkoyringar verða, av tí at talan verður um bygt øki á báðum síðum av vegnum.
   d) **at** tá ársmiðalferðslan í framtíðini fer upp um 18.000 bilar um samdøgri, ella onnur ferðsluviðurskifti viðføra ónøktandi framkomiligheit, kann ferðin um neyðugt hækkast til 80 km/t, samstundis sum íbindingarnar kunnu endurskoðast, og støða takast til um vegurin skal gerast 4-sporaður.

2. **Íbinding við tunnil hjá P/F Skálafjarðartunnilin**

   Vísandi til §5, stk. 3, litra 6 í *Ll. Nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir*, og *Almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu* verður mælt til:
   a) **at** seta fram krav til P/F Skálafjarðartunnilin og Landsverk um at fáa tekningar og nærri upplýsingar, um hvussu veganetið á Kaldbaksvegnum og til havnina á Sundi verður broytt í sambandi við tunnilsverkætlanina hjá P/F Skálafjarðartunnilin, til góðkenningar.
   b) **at** seta fram krav til P/F Skálafjarðartunnilin og Landsverk um at fáa neyvar tekningar og upplýsingar um hvørjar kommunalar og privatar jarðarognir verða ávirkaðar av broytingunum av veganetinum á Kaldbaksvegnum og til havnina á Sundi.

3. **Íbinding/frákoyring við núverandi Hvítanesvegin**
   Mælt verður til:
   a) **at** biðja Landsverk um neyvar tekningar og frágreiðing, um hvussu íbindingin/frákoyring millum nýggja landsvegin og Hvítanesvegin verður gjørd, til góðkenningar.

**4. Íbinding við vinnuøkini Sandvíkahjalli, Skarðshjalli og Ovari Hjalli**
Mælt verður til:
a) **at** kommunan útvegar sær lendi til vinnuøkið á Ovara Hjalla umframt lendi til vegaatkomu frá Hvítanesvegnum niðan á Ovara Hjalla og lendi til gerð av rundkoyring við Hvítanesvegin.
b) **at** kommunan letur gera útstykkingarætlan og tekniskt projekt fyri vinnuøkið á Ovara Hjalla
c) **at** kommunan letur gera kanningar av íbinding í nýggja innkomuvegin, og leggur av lendi til antin íbinding við rundkoyring ella T-kross íbinding á økinum við Ovara Hjalla. Víst verður í hesum sambandi eisini til omanfyri standandi pkt. 1a.

**5. Planskyld íbinding við Stórutjørn**
Mælt verður til:
a) **at** takað undir við uppskotinum hjá Landsverk um at gera planskylda íbinding við Stórutjørn, vísandi til væntandi nógva ferðslu og virksemi á hesum øki.
b) **at** samráðingar verða tiknar upp við Landsverk um allar íbindingar, og útreiðlsubýtið í sambandi við hesar.

**6. Flytan av atkomuvegnum við Stórutjørn**
Sambært upprunaligu linjuføringini, sum Tórshavnar kommuna ikki hevur fingið til ummælis, kom landsvegurin at ganga gjøgnum tjørnirnar á økinum. Samstundis hava interessentar í økinum sett fram ynski um at fáa landsvegalinjuna flutta 50 m longur vestur – tvs. burtur frá Stórutjørn. Onki er til hindurs fyri hesum.
Tí verður mælt til:
a) **at** landsvegurin verður fluttur 50 m longur vestur á økinum við Stórutjørn.
b) **at** nýggi sambindingarvegurin verður longdur tilsvarandi 50 m.
c) **at** kostnaðurin fyri arbeiðið verður at rinda av interessentunum, sum ynskja flyting av vegnum.

**7. Íbinding við Flatarvegin, Sundvegin og Villingardalsvegin**
Tað verður mett serstakliga umráðandi, at tað á vegastrekkinum frá Stórutjørn til Oyggjavegin verða tikin atlit til verandi kommunala veganet, og hvussu ferðslan av landsvegnum verður fordeild eftir verandi vegum inn til Vegin Langa og haðani víðari til Norðara ringvegin. Hetta fyri at høvuðsstaðurin eisini kann fáa veruliga nyttu av nýggja landsvegnum. Á hesum grundarlagi verður mælt til:
a) **at** fram til 2010, tá hesin parturin av landsvegnum eftir ætlanunum hjá Landsverk verður liðugur, verða Flatavegur, Sundsvegur og Villingardalsvegur bundnir í landsvegin beinanvegin og at teir partar av vegnum sum eru lidnir, sostatt verða nýttir beinanvegin.
b) **at** fyri tíðarskeiðið aftan á 2010 skulu minst 2 av teimum 3 verandi vegunum á staðnum – t.e. Flatarvegurin, Sundsvegurin og Villingardalsvegurin, verða íbundnir landsvegin við vanligum T-kross

íbindingum, so leingi ársmiðalferðslan ikki ger tað neyðugt at gera annað slag av íbindingum.

c) **at** nóg stórt øki skal verður lagt av, soleiðis at tað uppá sikt er møguligt at gera ferðslutekniskt hóskandi íbindingar har um leiðir, tá ársmiðalferðslan fer upp um 18.000 bilar ella um onnur ferðsluviðurskifti gera tað neyðugt, so sum ónøktandi framkomiligheit o.l.
d) **at** samráðingar verða tiknar upp við Landsverk um allar íbindingar og útreiðlsubýtið í sambandi við hesar.

**8. Tunnilsloysnir við Villingardalsvegin**

Tekniska umsitingin vísir á, at við tí vegalinju, sum nú er kend, eru tað ikki ferðslutekniskar orsøkir til at gera tunnil við Villingardalsvegin. Tekniska umsitingin staðfestir eisini, at tað eru ikki annarleiðis umhvørvislig atlit at taka á økinum við Krákugjógv enn aðrastaðni fram við landsvegnum, tá talan er um frástøðu frá bygdum øki, náttúruviðurskifti o.l. Hetta er m.a. grundað á simuleringar av óljóði frá landsvegnum, sum Landsverk hevur latið gera, og hevur lagt fram fyri limirnar í byggi- og býarskipanarnevndini, teknisku nevnd og heilsu- og umhvørvisnevndini. Tekniska umsitingin metir tí, at nyttuvirknaðurin av einum tunnli einans við ovasta part av Villingardalsvegnum ikki svarar til ein meirkostnað á kr. 20-30 mió. í kommununar part, samsvarandi skrivi frá Føroya landsstýri og eini leysligari kostnaðarmeting. Á hesum grundarlagi verður mælt til:

a) **ikki** at gera tunnil bert við ovara part av Villingardalsvegnum.
b) **at** Landsverk verður biðið um at gera skitsuuppskot, kostnaðarmeting og kost-nyttu kanning av at gera ein longri tunnil líka frá ovara parti av Villingardalsvegnum vestureftir undir Húsareyn, sum kemur útaftur vestan fyri Hotel Føroyar.
c) **at** samráðingar verða tiknar upp við Landsverk um útreiðslubýtið.

**9. Íbinding í verandi veganet undir Krákugjógv**

Tann 2-sporaða fyribilsloysnin hjá Landsverk við íbinding beinleiðis í vegin oman fyri P/F Wenzel Petersen verður als ikki mett nøktandi, tí hon verður ikki mett at beina ferðsluna inn á Norðara ringveg/Marknagilsvegin á ein tryggan og forsvarligan hátt.

Tann 4-sporaða framtíðarloysnin í uppskotinum hjá Landsverk, tá ársmiðalferðslan fer upp um 18.000 bilar, er ein planskyld íbinding við landsvegin, sum førir til eina rundkoyring á Norðara ringvegnum. Henda loysn tykist heldur kroyst og trupul á staðnum, og tekniska umsitingin ivast tí í, um hetta fer at virka nóg væl til at koyrandi fara at brúka hesa íbinding í so stóran mun, at tað fer at viðvirka til eina góða fordeiling av ferðsluni til og frá Norðara ringvegi.

Á hesum grundarlagi verður mælt til:

a) **at** tá talan er um fyribilsloysnina við 2-sporaða vegnum, verður hildið fast um upprunaligu loysnina, sum er at gera eina íbinding við rundkoyring, og so binda frákoyringina frá rundkoyringini í verandi vegin oman fyri P/F Wenzel Petersen.

b) **at** tá talan er um 4-sporaðu framtíðarloysnina, verður í fyrsta lagi víst til tilmæli til pkt. 8.b um at gera ein tunnil líka frá endanum á Villingardalsvegnum til ætlaðu vegaflættingarnar vestan fyri Hotel Føroyar..
c) **í øðrum lagi** verður mælt til at Landsverk, í samstarvi við kommununa, verður biðin um at gera skitsuuppskot, kostnaðarmeting og kost-nyttu kanning av at gera ein styttri tunnil uml. frá st. 6800 til ætlaðu vegaflættingarnar vestan fyri Hotel Føroyar. Hetta tilmæli er grundað á ferðslutekniskar orsøkir, og eigur tí at verða rindað til fulnar av landinum. Landið vil við hesum samstundis spara útreiðslur til ognartøkur, óljóðsverju o.a. á hesi leiðini, eins og tað slepst undan trupulleikanum við verandi íbindingum í Landsvegin við Brandstøðina, P/F Norðbil, P/F Wenzel Petersen og sethús á umrødda vegastrekki.
d) **at** gjørdar verða kanningar av hvørt Villingardalsvegurin ella ein nýggjur sambindingarvegur millum innkomuvegin og innara ringveg skal gerast fyri at binda saman hesar vegir, um tunnil verður gjørdur jbr. pk.t 9c ella 9d.

**10. Oyggjarvegurin frá Hotel Føroyar til Norðara ringvegin**

Tekniska umsitingin metir, at vegaføringin frá P/F Wenzel Petersen til íbindingarnar vestan fyri Hotel Føroyar, lýkur ikki tær ferðslutekniskи fyritreytirnar fyri einum 80 km vegi við nógvari ferðslu, sum Landsverk annars hevur lagt til grund fyri hesum nýggja landsvegnum sum heild á øðrum strekkjum. Tí verður mælt til:

a) **í fyrsta lagi** at Landsverk ger ein longri tunnil jbr. tilmælinum til omanfyri standandi pkt. 8.b.
b) **í øðrum lagi** at Landsverk ger ein styttri tunnil jbr. tilmælinum til omanfyri standandi pkt. 9.c.
c) **at** kommunan, sum avleiðing av aðrari av tunnilsloysnunum, yvirtekur landsvegastrekkið frá Hotel Føroyum oman til P/F Wenzel Petersen.

**11. Vegasamankomingar á økinum vestan fyri Hotel Føroyar**

Mælt verður til:

a) **at** taka undir við at økið vestan fyri Norðbil kann leggjast út til byggilendi, við serstøkum atkomuvegi, nøkulunda soleiðis sum projekterað av ráðgevunum hjá Landsverk.
b) **at** taka upp samráðingar við Landsstýrið/Fiskimálaráðið um keyp av lendi burtur av ”antennuøkinum”, matr. nr. 1231.
c) **ikki** at gera rundkoyring, men vanliga T-kross íbinding, har núverandi Oyggjarvegurin verður bundin í nýggja landsvegin, grundað við at onki er sum talar fyri, at ferðslan til hetta økið gerst so stór, at neyðugt er við rundkoyring við henda vegkross.
d) **at** nýggj íbinding oman móti býnum verður gjørd við eini stórari rundkoyring heldur enn eini planskyldari íbinding.

e) **at** nóg stórt øki tó verður lagt av, soleiðis at tað uppá sikt er møguligt at gera planskylda íbinding har um leiðir, seinast tá ársmiðalferðslan fer upp um 18.000.

**12. Vegaføring og íbinding í Velbastaðvegin**

Mælt verður til:

a) **fyribils at** taka undir við uppskotinum hjá Landsverk til vegaføring í Havnardali og íbinding í Velbastaðvegin, sum tekniska umsitingin metir vegatekniskt at verða nøktandi.

b) **at** biðja Landsverk um neyvari upplýsingar um hvat vegaføringin og íbindingarnar merkja fyri verandi bygging og vegir í økinum (Velbastaðvegin og vegin út í Havnadal), og somuleiðis fyri framtíðar møguleikarnar fyri bygging og vegum í økinum, áðrenn endalig góðkenning verður givin.

**13. Støðutakan til verandi íbindingar við Oyggjarvegin**

Norðbil, Brandstøðin og P/F Wenzel Petersen hava sum er íbinding í Oyggjarvegin, umframt at einstøk sethús á økinum eisini eru íbundin Oyggjarvegin.

Mælt verður til:

a) **at** tunnil verður gjørdur jbr. tilmælinum til omanfyri standandi pkt. 8.b. ella pkt. 9.c., og at kommunan sum avleiðing av hesum yvirtekur landsvegastrekkið frá Hotel Føroyum oman til P/F Wenzel Petersen, sum so verður kommunalur vegur, jbr. pkt. 10.c.

b) **at** uttan mun til um vegurin verður verandi landsvegur ella verður kommunalur vegur, má avvarðandi eigari av vegnum útvega nýggjar íbindingar fyri allar tær verandi íbindingarnar, sum verða burturbeindar ella fluttar.

**14. Støðutakan til veitingar til el, vatn, kloakk og fjarhita**

Sambært upplýsingum, sum tekniska umsitingin hevur fingið, hevur Landsverk ikki ætlanir um at gera fyrireikingar til at leggja leiðingar til el, vatn, kloakk og fjarhita í landsvegin.

Tekniska umsitingin metir, at tað er óhugsandi at hava ein høvuðsveg, sum fer gjøgnum bygt øki, og sum er myrkur, sum ikki loftar yvirflatuvatninum og ikki tekur hædd fyri brandpostum o.l.

Mælt verður til:

a) **at** krav verður sett fram um, at tílíkar leiðingar skulu leggjast í vegin, eins og gjørt verður aðrastaðni, har landsvegir fara gjøgnum bygt øki, og at samráðingar verða við Landsverk um útreiðslubýtið í hesum sambandi.

b) **at** krav verður sett Landsverk um burturbeining og reinskan av vegvatni, jbr. býráðssamtykt, j. nr. 2005-1437.

c) **at** gera avtalu við Landsverk um at fyrireikingar verða gjørdar til at fjarhitaleiðingar kunnu leggjast í vegkantin.

**15. Støðutakan til gonguteigar og súkklubreytir**

Vísandi til krøv um ferðslutrygd fyri ein slíkan veg, sum fer gjøgnum bygt øki fyri bæði gangandi og súkklandi fólk, verður mælt til:

a) **at** Landsverk letur gera gonguteigar og súkklubreytir, jbr. býráðssamtykt um gonguteigar og súkklubreytir j. nr. 2005-1436.
b) **at** hámarksferðin fyri vegastekkið frá planskyldu íbindingini við Stórutjørn til ætlaðu nýggju íbindingina vestan fyri Hotel Føroyar, verður samsvarandi omanfyri standandi pkt. 1.c

**16. Støðutakan til byggilinju (frástøðu) frá landsvegnum**

Mælt verður til:

a) **at** gera avtalu við Landsverk um eina byggilinju fram við Landsvegnum, sum liggur í eini fjarstøðu á 25 m frá vegmiðju, á øllum vegastrekkinum, roknað út frá einum 4-sporaðum vegi. Tó verður mælt til at tað í sambandi við byggilinjuna í samráð við Landsverk verður tikin hædd fyri størri fjarstøðu á teimum støðum, har størri íbindingar væntast at koma í framtíðini.

**17. Verja móti óljóði**

Vísandi til pkt. 16 er umráðandi at tað, har nýggi landsvegurin fer gjøgnum býin, ikki koma at liggja stór øki á báðum síðum, sum verða ónýtilig til bygging. Tað eigur at kunna byggjast í øllum førum so nær sum 25 m frá vegmiðju, roknað út frá einum 4-sporaðum vegi. Tí verður mælt til:

a) **at** krav verður sett Landsverk um at verja móti óljóði eigur at verða gjørd fram við vegnum allan vegin frá Kaldbaksvegnum til Havnardal, har lendisviðurskiftini ikki loysa trupulleikan við óljóði við støði í hámarksferðini á vegastrekkinum, jbr. frammanfyri standandi pkt. 1a, og við støði í at óljóð skal verða max 55 dB í eini frástøðu á 15-20 m frá vegmiðju.
b) **at** byggimyndugleikin – t.e. Tórshavnar kommuna – skal góðkenna slíkar ljóðverjur við atliti til útsjónd, tilfar o.a., og at ljóðverjan í minst møguligan mun skal taka burtur útsýnið og møguleikarnar fyri orientering hjá bilførarunum.

**18. Byggimálsviðgerð og avtala við Landsverk.**

Mælt verður til:

a) **at** fráboða Landsverk, at vegurin skal viðgerast og hava loyvi frá Tórshavnar kommunu, sum byggimyndugleiki, sambært *Ll. Nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir,* §5, stk. 3, litra 6 og sambært *K. Nr. 57 frá 27. apríl 2001 um kommunala byggimálsviðgerð.*
b) **at** vísa Landsverk á býráðssamtykt um gonguteigar og súkklubreytir j. nr. 2005-1436 og á býráðssamtykt um reinskan av vegvatni j. nr. 2005-1437.
c) **at** gera avtalu við Landsverk um fyribils íbindingar, endaligar íbindingar, projektbroytingar, býtislykil fyri ávísar útreiðslur o.a.

**19. Tíðarætlan og raðfylgja.**

Mælt verður til:

a) **at** taka undir við ætlanini hjá Landsverk at gera vegin lidnan til 2010.
b) **at** gera avtalu við Landsverk um í fyrstu atløgu at arbeiða norðureftir frá har vegurin nú er, og so samstundis at gera tær kanningar v.m. viðv. vegaføringini frá har vegaarbeiðið er komið til nú við endan á Villingardalsvegnum til Oyggjarvegin, vísandi til omanfyri standandi tilmæli í punktunum 7, 8, 9, 10, 11, 12 og 13, og at framhaldið av arbeiðinum suðureftir verður tikið uppaftur, tá nevndu viðurskifti eru loyst.
c) **at** Landsverk og Tórshavnar kommuna í felag arbeiða við at lýsa og loysa omanfyri nevndu viðurskifti, at leggja fyri til endaliga góðkenning seinast 1. desember 2007.

**20. Ferðslutrygdarmeting**

Mælt verður til:

d) **at** projektið viðv. nýggja innkomuvegnum, íbindingar í kommunala veganetið, og fordeilingin av ferðslu frá innkomuvegnum inn á kommunala veganetið, verður latið serkønum at meta um, serliga við atliti til ferðslutrygd.

**Tekniska nevnd 23. mai 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum við hesum viðmerkingum:

- Viðv. pkt. 7.b vil ein minniluti, Høgni Mikkelsen, hava at allir tríggir verandi vegir á staðnum skulu bindast í landsvegin.
- Nevndin varð samd um at strika pkt. 8.c.
- Ein minniluti, Katrin Dahl Jakobsen og Høgni Mikkelsen, mælir til at kanna vegagerð upp á Húsareyn eisini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. juni. 2007:** Nevndin viðgjørdi og samtykti at taka undir við tilmælunum til hesi puntk: pkt. 4 a og b, pkt. 6, pkt. 11 a og b, pkt. 12 b, pkt. 14 a, pkt 16, pkt 17 a, og b og pkt. 18 a.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við meirilutanum í teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndini.

Viðv. pkt. 7b mælir ein minniluti, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen, til at allir tríggir vegirnir skulu bindast í landsvegin.

Ein minniluti, Høgni Mikkelsen, mælir til at kanna vegagerð upp á Húsareyn eisini.

**Býráðið 21. juni 2007:** Fyrst varð atkvøtt um minnilutatilmælið frá Høgna Mikkelsen og Jan Christiansen í fíggjarnevndini, ið fall við 4 atkvøðum fyri og 8 ímóti.

Fyri atkvøddu: Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen, Elin Lindenskov og Annika Olsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Bjarti Mohr.

Síðan varð atkvøtt um minnilutatilmælið frá Høgna Mikkelsen í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 5 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Katrin Dahl Jacobsen, Elin Lindenskov, Annika Olsen og Høgni Mikkelsen.

Greiddu ikki atkvøðu: Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Kathrina Frýdal, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen og Jan Christiansen.

At enda varð samtyktin í fíggjarnevndini einmælt samtykt.

- Umsitingin leggur fram frágreiðing frá Rambøll.

**Tekniska nevnd 16. apríl 2008:** Grundað á niðurstøðuna í ferðsluanalysu hjá Rambøll & Nyvig A/S frá apríl 2008 (j. nr. 2001-0407/79), samtykti nevndin at heita á umsitingina at taka upp samráðingar við Vinnumálaráðið og Landsverk á hesum grundarlagi:

1. at mest loyvda ferð á innkomuvegnum, á strekkinum frá Stórutjørn (T2) til íbindingina vestan fyri Hotel Føroyar (T8), verður 60 km/t,
2. at flest møguligar íbindingar á nevnda strekki verða gjørdar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 24. apríl 2008:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 24. apríl 2008:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur saman við leiðlsuni og umboð frá teknisku nevnd havt samskifti við landsstýriskvinnuna í innlendismálum – Anniku Olsen. Eitt av málunum, ið partarnir eru samdir um at royna, er at fáa sett gongd á avtalu, ið fyribils loyvir kommununi at nýta partar av innkomuvegnum.

Kunnað verður um málið.

**Tekniska nevnd 16. juni 2009:** Kunnað var um málið.

**Ískoyti:**
Umsitingin kunnar um status í málinum.

**Tekniska nevnd 11. februar 2010:** Kunnað varð um málið, og nevndin ynskir at viðgera málið á næsta fundi tann 4. marts 2010.

Kunnað verður um málið.

**Tekniska nevnd 8. apríl 2010:** Kunnað var um málið.

**Tilmæli:**
Tilmæli kemur til fundin.

**Ískoyti:**
Á løgtingsfíggjarlógini eru settar av kr. 10 mió. til nýggja innkomuvegin til Tórshavn. Landsverk hevur í hesum sambandi verið á fundi við umsitingina, til tess at finna fram til eina semju um, hvussu arbeiðið kann halda fram, soleiðis at játtanin fyri 2013 verður nýtt. Landsverk er framvegis av tí áskoðan, at nýggi innkomuvegurin skal gerast út frá teimum fortreytum, at hámarksferðin skal verða 80 km/t. Hetta viðførir ymisk dýrkandi krøv til hvussu íbindingarnar skulu gerast uppá sikt, tá miðalferðslan pr. døgn gerst størri, sambært framskrivingum sum gjørdar eru.

Í hesum sambandi hevur serliga verið roynt at finna eina hóskiliga loysn á, hvussu Sundsvegurin kann knýtast í nýggja innkomuvegin, og hevur Landsverk tilevnað eitt uppskot, sum umsiting kommununar metir at verða ein nýtilig loysn, undir teimum umstøðum sum eru á staðnum.

Eisini hevur íbindingin í Oyggjarvegin verið til viðgerðar, og er lagt upp til eina loysn sum er nøktandi í nøkur ár fram. Tá miðalferðslan pr. døgn gerst størri, er neyðugt at taka hesa íbinding upp aftur til nýggja viðgerð.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til fylgjandi:
- at loyva Landsverk at halda áfram við vegagerðini frá brúnni um Hoydalsá og vestureftir
- at taka undir við prinsippuppskotinum til íbindingarloysn við Sundsvegin
- at játtanin hjá Landsverk í ár verður brúkt til at gera íbindingina við Sundsvegin, og at restin av játtanini verður brúkt til at halda áfram við vegagerðini vestureftir, oman móti Krákugjógv
- at gera avtalu við Landsverk um, at framhald av arbeiðinum í 2014 og komandi ár, verður gjørt eystureftir, soleiðis at bundið verður í Kaldbaksvegin, áðrenn hildið verður áfram vestureftir. Hetta fyri at fáa vegasamband frá Kaldbaksvegnum til Sundsvegin liðugt fyrst.

**Tekniska nevnd 16. apríl 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 2. mai 2013:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Kunnandi fundur um málið, hevur verið fyri býráðslimum, har umsitingin greiddi frá gongdini í málinum. Eisini var greitt frá fundunum sum umsitingin hevur havt við Landsverk um teknisku viðurskiftini í samband við íbindingar.

Niðurstøðan á kunnandi fundinum varð, at mæla býráðnum til at takað undir við samtyktini í teknisku nevnd 16. apríl 2013, við hesum ískoytistreytum:

- at vegasambandi frá á leið við vatnbrunnarnar við Villingardalsvegin til Hotel Føroyar, verður loyst við tunnli, sum landið rindar og ger sum partur av landsvegnum
- at ein greið avtalað um útreiðslubýtið til íbindinga verður gjørt, har landsmyndugleikarnir átakað sær allan kostnað fyri íbindingarloysnirnar, sum er avleiddur av at Landsverk heldur fast við at talan skal verða um 80 km veg.

**Fíggjarnevndin 30. mai 2013:** Einmælt samtykt at mæla býráðnum at taka undir við tilmælinum frá teknisku nevnd 16. apríl 2013 og ískoytistreytunum sambært ískoytinum til fíggjarnevndarfundin.

**Býráðið 30. mai 2013:** Einmælt samtykt.

**120/13** **2005-2467**

**Innangarðsútskifting av Hest bygd**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Matrikulstovan fráboðar Tórshavnar kommunu í skrivi, dagfest 22. september 2005, at farið verður í gongd við innangarðsútskifting av Hest bygd.

Vanligt er at kommunur nýta henda møguleika at ognartaka lendið til øll almenn endamál smb. § 22. Hetta er tí, at tað ognartikna lendið verður latið av øllum eigindómum, og endurgjaldið verður latið yvir útskiftingarroknskapin.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at kommunan fyribils ognartekur lendið sambært hjálagda korti, dagf. 1. nov. 2005, tíh.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 7. november 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 24. november 2005:** Tikið av skrá.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at Tórshavnar kommuna ognartekur omanfyrinevndu øki til sethúsabygging, og at málið verður lagt fyri hest- og koltursnevndina

**Byggi- og býarskipanarnevndin 6. desember 2005:** Vísandi til at fundarfrásøgnin frá 7. november 2005 var skeivt skrivað, samtykti nevndin at beina málið í hest/koltursnevndina til ummælis.

**Hest-koltursnevndin 1. februar 2006:** Nevndin mælir til at taka undir við tilmælinum frá býararkitektinum.

Eisini verður mælt til, at Tórshavnar kommunan ognartekur lendið millum vegin og havnaøkið.

**Fíggjarnevndin 15. mars 2006:** Samtykt at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 3. apríl 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá býararkitektinum, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 27. apríl 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Matrikulstovan hevur nú gjørt eitt fyribils uppskot til innangarðsútskifting av Hest bygd. Í hesum sambandi hevur borgarafundur verið, og partarnir hava havt møguleika til at mótmæla og koma við broytingaruppskotum, áðrenn tað endaliga uppskotið verður lagt fram.

Viðv. tí lendinum, sum kommunan ætlar at ognartaka, hava verið einkultar viðmerkingar. Tí verður skotið upp, at økini verða broytt sambært tilmælinum frá býararkitektinum.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at:
1. øki 105 verður strikað, meðan øki 106 verður víðkað niðan til garðin, sum víst á viðlagda korti.
2. øki 104 er broytt, sum víst á viðlagda korti.
3. øki 103 er óbroytt.
4. økini 101 og 102 eru løgd saman og broytt soleiðis, at møguleiki er at gera “atgongd” til økini 103 og 104, uttan at fara inn í bygningarnar fram við

núverandi gøtu. Viðmerkjast skal, at bygningurin, sum kemur at liggja í nýggja øki 102, er gamla elektrisitetsverkið.

Útskiftingin ætlar at halda tað ætlaða ognartiknað metið, soleiðis at fyribilsplanurin nærum kann nýtast sum endaligur planur.

**Hest-koltursnevndin 27. september 2006:** Nevndin tekur undir við býararkitektinum, tó má hædd takast fyri økið 102, sum má víðkast til eisini at fevna um fótbóltsvøll - sí tekning.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 27. november 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum frá býararkitektinum og hædd verður tikin fyri áheitanini frá staðbundnu nevndini.

**Ískoyti:**
Málið hevur ligið hjá Umhvørvisstovuni eina tíð, men er nú tikið uppaftur. Samráðingar hava verið við Umhvørvisstovuna-Matrikulstovuna tann 17. februar 2011, har avtalað varð, at tillaga økini til aktuella tørvin. 1. mars 2011 kom endurskoðað uppskot til ognartøku frá Matrikulstovuni, og mælir umsitingin og býararkitekturin nevndini til at taka undir við hesum fyribilsuppskotinum. Tá fyribilsuppskotið er staðfest, og møguligar smærri tillagingar gjørdar, verður ein endalig fullfíggjað ognartøkusamtykt løgd fyri býráðið, umvegis avvarðandi nevndir.
Fíggjarlig binding fyri kommununa verður uml. 40 kr/m²x 6.135 m² = 245.400 kr. íroknað er tá endurgjald fyri mist bitrættindi á kr. 4,80/m².

Sí hjáløgdu kortskjøl:
Skriv um ognartøku 1.02.2011
Listi yvir eigarar og broytt ognarviðurskifti
Kortuppdráttur av uppskoti

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við uppskotinum og beinir málið í fíggjarnevndina.

**Býráðið 14. apríl 2011:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 4. mai 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 26. mai 2011:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Ognartøkan er avgreidd, og skal kommunan rinda fyri ognartøkuna.

| | |
|---|---|
| Breiðkan av vegnum í bygdini | 1.180 m² |
| Lendið til bryggjuøki | 671 m² |

| | | |
|---|---|---|
| Lendið grundøki og leikvøll | 3.300 $m^2$ | |
| Tjaldingarøki | 1.083 $m^2$ | |
| Í alt. | 6.234 $m^2$ á kr. 40,53 = | kr. 252.650,90 |

| | | |
|---|---|---|
| + Endurgjald fyri ein hjall við svimjihøllina | kr. | 21.000,00 |
| + annað | kr. | 8.067,27 |
| = rokningar at gjalda í alt | kr. | 281.718,27 |

**Tilmæli:**
Leiðarin í løgdeildini og kommunustjórin mæla til at játta nevndu upphædd í alt umleið kr. 282.000,00 til ognartøkuna. Játtað av konto 20910 aðrar útreiðslur.

**Fíggjarnevndin 29. mai 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 30. mai 2013:** Einmælt samtykt.

**FUNDUR LOKIN KL. 21:40**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Arge | Elin Lindenskov | Bjørghild Djurhuus |
| Helena Dam á Neystabø | Sigrún Mohr | Tróndur Sigurdsson |
| Halla Samuelsen | Marin Katrina Frýdal | Jákup Dam |
| Sjúrður Olsen | Bogi Andreasen | Annfinn Brekkstein |
| | Heðin Mortensen | |